# AÐALFUNDUR HJÁ KOMMUNUFELAGNUM

# 2023

Kommunufelagið



Útgevari: Kommunufelagið
Uppseting: Nudlavirkið
Myndir: Ólavur Frederiksen, Amy Hansen og Pexel
Prent: Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit


1. **Vælkomin** .... 4
2. **Nýtt landsstýri** .... 6
3. **Politisku lyftini** .... 8
4. **Vælferðarøkini** .... 10
   Barnaøkið .... 10
   Eldraøkið .... 11
5. **Skúli og mentan** .... 12
   Eftirmeting av fólkaskúlanum .... 12
   Sernámsfrøði/Sernám/ Tænastan frá Sernámi .... 13
   Undirvísing í føroyskum máli og føroyskari mentan fyri útlendingar .... 13
   Bókasavnsøkið .... 13
6. **Umhvørvi og vinna** .... 14
   Eftirmeting reglugerð um óljóð .... 14
   Grønar havnir .... 15
   Felags renovatiónsskipan .... 15
   Elorkuøkið .... 15
   Oljutangar, spillivatn og grundvatn .... 16
   Býarskipan, bygging og lendisætlan .... 16
   Tóm hús .... 17
7. **Annað virksemi í húsinum** .... 20
   Barnaverndarstova Føroya .... 20
   Kommunala Arbeiðsgevarafelagið .... 22
   SSP-ráðgevingin .... 25
   Verkætlanin, Talgilda HeilsuSkipanin .... 25
8. **At enda** .... 27
9. **Kommunubúskapurin 2022** .... 28
   Gongdin í fólkatalinum í 2022 .... 28
   Kommunubúskapurin .... 29
10. **Kommuna og kommunuhugtakið** .... 44
11. **Um Kommunufelagið** .... 46
   Viðtøkur fyri Kommunufelagið .... 48
   Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið .... 50
   Viðtøkur fyri Barnaverndarstovu Føroya .... 52

# 1. Vælkomin

Góðu fundarfólk.
Hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum. Nummar tíggju í røðini síðani felagið varð stovnað í 2014.

Eg skal takka fyri høvið at hava mína fyrstu ársfrágreiðing sum formaður felagsins og samstundis takka fyri álitið, ið mær varð víst, tá eg varð valdur formaður fyri felagsskapin beint eftir nýggjár.

Eisini takki eg Heðini Mortensen, fráfarandi formanni, fyri samstarvið seinastu tvey árini; eg vóni, at samstarvið verður eins gott komandi tvey árini, nú vit býta um leiklut.

Seinasta árið hevur verið hendingaríkt. Vit høvdu ikki meira enn slept koronakreppuni, so vitjaði onnur kreppa, sum var nógv álvarsligari enn tann fyrra. Stórkríggj í hjartanum á Evropa.

Hvønn dag lesa og síggja vit á tíðindaportalum og á sjónvarpsskíggjum dømi um neyðina og ræðuleikarnar í Ukraina.

Ítøkiliga hevur hetta havt við sær, at Føroyar á fyrsta sinni hava tikið ímóti munandi tali av flóttum. Hetta hava vit higartil megnað væl og virðiliga, eisini kommunurnar hava havt ein týðandi leiklut í hesum samanhangi.

Føroyingar merkja eisini í aðrar mátar avleiðingarnar av krígnum. Vørur og tænastur dýrka, rentan hækkar, og lánsbyrðan kennist sera tung hjá nógvum húskjum.

Men yvirskipað gongst framhaldandi væl í Føroyum. Føroyska samfelagið hevur seinastu árini upplivað ein stóran búskapar- og fólkavøkstur. Komandi árið fer fólkatalið helst fyri fyrstu ferð nakrantíð upp um 55.000 fólk.

Hóast gongdin í samfelagnum sum heild er góð, so er neyðugt, at vit brynja okkum til framtíðina. Fólkasamsetingin broytist, og hetta fer at leggja stórt trýst á føroyska búskapin og ikki minst á kommunalu kassarnar.

Týðandi vælferðartænastur eru seinastu árini lagdar kommununum at fyrisita. Kommunurnar hava í dag fyri ein stóran part ábyrgdina av at raðfesta, menna og umsita vælferðina og trivnaðin hjá bæði børnum, vaksnum og eldri.

Hesa stóru ábyrgd eiga vit at handfara og umsita við skili, virðing og hegni – eisini við tí fyri eyga at lata okkara eftirkomarum eitt væl rikið og haldført samfelag. Tað setir fyrisitingarlig og fíggjarlig krøv til kommunurnar og krøv til okkum kommunustýrislimir um at stýra væl og rættvíst.

Men sum orðatakið sigur: Eingin toyggir seg longri, enn armarnir røkka. Loysnir upp á framtíðar avbjóðingar eiga vit tí at finna í felag - land og kommunur.

Men uppgávan hjá Kommunufelagnum fer samstundis áhaldandi – og kanska meira enn áður – at vera at verja sjálvsavgerðarrættin hjá kommununum, soleiðis at lokala fólkaræðið ikki verður innantómt ella hótt av krøvum ella uppgávum, sum fíggjarligt grundarlag ikki er fyri.

Tað er okkara skylda at tryggja, at vit sum fáast við kommunupolitikk, ikki enda við at gerast okkurt slag av bókhaldarum, sum einans flyta pening í og úr kommunukassunum eftir lógum, sum løgtingið ger, uttan at hava ávirkan á økini, sum vit umsita; og uttan at nakað er eftir, ið vit sjálv kunnu raðfesta til tað, sum vit halda hevur týdning í lokaløkinum.

Og tað er okkara skylda at syrgja fyri, at tey, ið eftir okkum koma, eisini fara at hava tann framíhjárætt at skipa seg í staðbundnar eindir við heimildum at skipa og ávirka egin viðurskifti í samljóði við tørv og ynski hjá borgarum á staðnum.

Vit skulu sum felag verja staðbundna fólkaræðið.

Í hesi fyrstu ársfrágreiðing míni fari eg at leggja dent á nøkur yvirskipað mál, sum hava týdning fyri okkum, sum varða av kommununum, heldur enn neyvt at ganga ígjøgnum allar smálutir, sum hava verið fyri seinasta árið.

Enn einaferð hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Kommunufelagnum.

Tórbjørn Jacobsen, formaður í Kommunufelagnum



Formansskifti í Kommunufelagnum 1. januar 2023



# 2. Nýtt landsstýri

Politiska virksemið hjá Kommunufelagnum er altíð nógv tongt at landspolitisku støðuni og teimum ætlanunum, sum landsins stjórn hevur.

Við ársenda var stjórnarskifti í Føroyum. Nýggj samgonga varð skipað millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn.

Lyftini í valstríðnum vóru mong, og hesi síggjast eisini aftur í stjórnargrundarlagnum, samgonguskjalinum: Lønarlyft til ávísar fakbólkar, stytt arbeiðsvika og skattalætti eru nøkur av lyftunum.

Ætlanin er at fremja eitt lønarlyft skjótast møguligt, og landsstýrið hevur nú kunngjørt, at tað verður latið námsfrøðingum, námsfrøðihjálparum, hjálparfólki, heilsurøktarum og heilsuhjálparum við og uttan útbúgving.

Nær skattalætti og stytt arbeiðsvika verða framd í verki, er ikki kunngjørt enn.

Eitt lønarlyft, sum ætlanin er at gera, hevur stóra fíggjarliga ávirkan á kommunala geiran. Leysliga mett starvast umleið ¾ av teimum, sum ætlanin er at geva lønarlyft, hjá kommununum. Talan er um fakbólkar, sum starvast innan eldra-, dagstovna- og almannaøkið, har trupult er at nøkta starvsfólkatørvin.

Í samgonguskjalinum stendur greitt, at kommunurnar skulu haldast skaðaleysar í mun til tey lyfti, sum samgongan nú ætlar sær at fremja. Tí hava drúgvar samráðingar eisini verið millum landsstýrið og Kommunufelagið um hesi viðurskifti, líka síðani nýggja landsstýrið tók við. Tað tykist, sum sitandi landsstýri veruliga hevur ætlanir um, at kommunurnar verða hildnar skaðaleysar. Tað gleðast vit um.

Kommunufelagið vildi, at landsstýrið, longu tá samgonguskjalið varð tilevnað, beyð felagnum at umrøða evni, ið viðvíktu kommununum, áðrenn skjalið var endaligt – soleiðis sum aðrir bólkar og stovnar í samfelagnum sluppu. Hetta varð ikki gjørt. Kommunufelagið fanst at landsstýrinum fyri hetta, og landsstýrið ásannaði, at hetta var eitt mistak.

Tað hevur ongantíð verið meira neyðugt enn nú, at landsmyndugleikar og kommunur vita hvør av øðrum og hava gott og regluligt samskifti. Kommunufelagið sendi tí eitt skriv til landsstýrið longu 3. januar 2023 við áheitan um at fáa eina fasta samskiftisskipan í lag millum land og kommunur. Skotið varð upp at hava afturvendandi fundir við tí endamáli at skapa eitt meira skipað samskifti og

sínámillum kunning, bæði um ætlanir og áleikandi mál. Skrivið varð væl móttikið, og nærum beinanvegin varð formansskapurin boðin á fund við landsstýrið.

Síðani hevur samskiftið millum landsstýrið og Kommunufelagið verið regluligt og gott.

Nýggja landsstýrið hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at fremja stór og kostnaðarmikil mál. Sum í flest øllum øðrum politiskum málum er undirtøkan fyri hesum treytað av politisku sannføringini hjá tí einstaka. So man eisini vera í hesum felagsskapi.

Eitt kunnu vit tó vera samd um, og tað er, at okkara lutur sum kommunustýrislimir fyrst og fremst er at tæna okkara egnu kommunu og tí fólki, sum har býr. Í okkara leikluti sum kommunufelag er aðalmálið sjálvandi at tæna tí kommunala geiranum í breiðasta týdningi: At síggja allan kommunala geiran, ikki bara út frá egnum útgangsstøði, men eisini úr einum kommunalum – og viðhvørt eisini samfelagsligum - heildarsjónarmiði.

Tað er mangur leikur í longum talvi, og soleiðis er eisini við nógvum av teimum málunum, ið vit sum kommunufelag fáast við.

Tað eru ikki so nógv ár síðani, vit yvirtóku eldraøkið, og við tí – saman við landinum – avráddu ein fíggingarleist, sum tá sá út til at vera okkum kommunum tryggur í nógv ár fram. Men vit síggja longu nú, at her var nógv, sum vit antin ikki høvdu nóg greitt tá, ella sum er broytt munandi hesi fáu árini.

Tað er tí ikki uttan høvuðbrýggj, at vit nú eru í gongd við at greina kostnaðin hjá kommununum av politisku lyftunum, sum landsstýrið ætlar sær at fremja.

Stórur partur av lønarlyftinum verður fíggjaður við at hækka veiðigjøld og tøkugjøld. Hetta hevur negativa ávirkan á partafelagsskattin og hýrurnar, sum tí rakar nakrar kommunur harðari enn aðrar. Lønarlyftið rakar eisini kommunur ymiskt. Nakrar kommunur fáa lutfalsliga størri útreiðslur enn aðrar orsakað av lønarlyftinum.

Hetta ger sjálvandi, at tað er trupult at finna ein javnt rættvísan afturberingarleist fyri allar kommunur. Men mest av øllum vísir hetta kanska, at alt hevur ein kostnað, og onkur skal gjalda. Politikkur snýr seg í stóran mun um raðfestingar og um at umskipa virðini í samfelagnum. Hetta gera vit eisini í lokalpolitikki, tá vit til dømis hava dagstovnapláss ella búpláss á ellis- og røktarheimum fyri undir kostprís.

Vit eiga tó at krevja, at førdi politikkurin leggur upp fyri teimum avbjóðingum, sum liggja fyri framman, og at vit, sum varða av Kommunufelagnum, ikki bert hugsa út frá egnum útgangsstøði, men eisini út frá einum heildarsjónarmiði, soleiðis at kommunurnar í Føroyum altíð hava áleið javnbjóðis umstøður at virka og raðfesta undir.

## Hendingar í árinum

# "Eg vil hava innlit í øll míni skjøl hjá tykkum"

Nakað soljóðandi innlitsumbøn fekk eitt kommunalt eldrasamstarv. Umbønin var undirritað av borgaranum, men send inn av einum avvarðandi hansara. Samstarvið bað tí um ráðgeving viðvíkjandi hvørji formkrøv eru galdandi fyri innlitsumbønir. Í spurninginum lá, um orðingin var nóg neyv, og um tann avvarðandi kundi senda innlitsumbønina vegna borgaran.

Skrivstovan vísti á, at í grundini eru ongi formkrøv til, hvussu ein innlitsumbøn verður latin. Umbøn um innlit kann tí latast bæði skrivliga og munnliga.

Borgarin hevur eisini rætt at lata seg umboða og harvið eisini at fáa onnur at senda umbønina sína vegna. Tó má í hesum sambandi metast um, hvørt umboðið – í hesum føri ein avvarðandi – eisini er heimilað at taka ímóti skjølunum, tað vil siga fáa avrit av tí, sum verður latið borgaranum.

Borgarin skal í umbønini vísa á viðurskifti, sum gera tað gjørligt hjá myndugleikanum at finna málini – hetta verður vanliga nevnt identifikatións-kravið. Tað skal tó ikki nógv til. Danski umboðsmaðurin hevur í einum ítøkiligum máli úttalað, at tað var nøktandi identifikatión, at borgarin bað um innlit í "... mine akter, der henligger i direktoratets forskellige afdelinger".

At enda vísti skrivstovan á, at onki er til hindurs fyri at fara í samskifti við borgaran um, hvørt tað eru mál og viðurskifti, sum hava serligan týdning ella áhuga – og um tað harvið eru onnur viðurskifti, sum kunnu haldast uttanfyri innlitið. Samskiftið má tó ikki at verða tikið upp við tí endamáli at avmarka innlitsumbønina. Víst varð á, at borgarin ikki á nakran hátt kann krevjast at grundgeva fyri, hví hann biður um innlit.

# 3. Politisku lyftini

## Lønarlyfti

Sambært samgonguskjalinum skulu lægst løntu bólkarnir á umsorganarøkjunum fáa eitt lønarlyft. Landsstýrið hevur nú boðað frá, at teir bólkar, ið verða fevndir av lønarlyftinum eru: námsfrøðingar, námsfrøðihjálparar, hjálparfólk, heilsurøktarar og heilsuhjálparar við og uttan útbúgving. Tað vil siga, at talan er í stóran mun um fólk, ið starvast í kommununum.

Lønarlyftið fær virknað 1. januar 2024, og sambært landsstýrinum verður talan um lønarhækkingar á samanlagt 47 mió. kr. Roknað verður við, at væl meira enn helvtin av hesum kostnaði fellur á kommunurnar. Landsstýrið hevur boðað frá, at kommunurnar fáa endurgjald fyri lønarlyftið.

Samráðingar hava verið millum landið og stýrið í Kommunufelagnum hesum viðvíkjandi. Tann loysn, sum er í eygsjón, er tann, at landið átekur sær partin hjá komm_ununum av sokallaða pensjónistafrádráttinum (§ 3, stk. 4 í ásetingarlógini). Í dag er tað soleiðis, at allir fólkapensjónistar fáa afturborið 3.000 kr. árliga í landsskatti og 3.000 kr. árliga í kommunuskatti. Ætlanin er nú í staðin at afturbera 6.000 kr. úr landsskatti og onki í kommunuskatti.

Ein slík broyting hevði økt skattainntøkurnar hjá kommununum við umleið 26 mió. kr. árliga. Um tað er nóg mikið til at kompensera fyri lønarlyftinum er enn ikki heilt greitt. Møguliga verður neyðugt við restfígging. Mangla nakrar milliónir í, so eru nógvir møguleikar, til dømis kundi landið átikið sær ein størri part av rentustuðlinum.

Annars er at siga um pensjónistafrádráttin, at talan er um eina skipan, sum varð kroyst niður yvir kommunurnar av undanfarnu samgongu, uttan at nakað endurgjald kom upp á tal yvirhøvur. Talan er sostatt bara um, at kommunurnar fáa sínar egnu inntøkur aftur.

Hóast landsstýrið leggur stóran dent á, at lønarlyftið kemur oman á lønarkarmin og ikki verður partur av lønarsamráðingunum annars, so er tað sera ivasamt, um fakfeløgini, ið ikki fáa lønarlyft, fara at góðtaka hetta. Tí tað verður trupult at fáa fakfeløgini at góðtaka ein fastan lønarkarm, um landsstýrið ikki sjálvt heldur seg til ein fastan karm, men gevur summum meira enn øðrum. Tað er heldur ikki serliga sannlíkt, at allir teir bólkar, ið verða lyftir, verða heilt nøgdir við sítt lønarlyft. So tað er stórur vandi fyri, at vit hava nøkur rokalig ár á almenna arbeiðsmarknaðinum fyri framman.

## Arbeiðsvikan og haldføri

Samgongan hevur søguliga stórar ætlanir, tá tað kemur til arbeiðsmarknaðarmál. Umframt tað politiskt ásetta lønarlyftið – sum ikki er sæð í Føroyum áður – ætlar landsstýrið eisini at stytta arbeiðsvikuna úr 40 tímum niður í 37 tímar. Hetta verður gjørt við lóg, og tað er ikki gjørt síðan 1978.

Av teimum, ið starvast hjá kommununum, eru bara umleið 1/3, ið er sett til at arbeiða meira enn 37 tímar. Ein stórur partur, serliga á eldra- og dagstovnaøkinum, eru sett at arbeiða væl minni enn tað. So hjá nógv teimum flestu kommunalt settu verður ikki talan um meira frítíð, heldur verður talan um eina lønarhækkan.

Samlaði lønarkostnaðurin hjá kommununum er umleið 1,7 mia. kr. Roknað verður við, at stytta arbeiðsvikan fer at økja um lønarkostnaðin við góðum 5%, ella umleið 90 mió. kr. árliga.

Hóast bruttoskostnaðurin er 90 mió. kr., er ikki sikkurt, at uppskotið fer at kosta kommununum stórvegis samanlagt, ið hvussu er ikki í fyrsta umfari. Orsøkin er tann, at stytta arbeiðsvikan fer at hava við sær eina lønarhækking fyri tann samlaða føroyska arbeiðsmarknaðin, og av samlaðu hækkingini enda umleið 22% í kommunukassunum sum kommunuskattur og eftirlønarskattur. Samlaðu lønargjaldingarnar í Føroyum eru omanfyri 11 mia. kr. árliga. Tær hjá kommununum eru einans 1,7 mia. kr. ella 15% av samlaðu lønargjaldingunum. So hóast lønarkostnaðurin hjá kommunum veksur vegna stytta arbeiðsviku, so fara inntøkurnar frá kommunuskatti eisini at vaksa munandi. Ilt er at siga neyvt, hvat veksur meira, men samanlagt verður helst nær við javnvág.

Verri er tó at meta um, hvat hendir sum frá líður. Tá veldst alt um, hvussu stytta arbeiðsvikan fer at ávirka arbeiðshugin hjá føroyingum. Tí ongin ivi er um, at minkar útboðið av arbeiðsmegi, so versnar haldførið hjá almenna geiranum. Tá mugu so tillagingar gerast í skattatrýstinum og almenna tænastustøðinum.

Nýggja landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa skil á fíggjarstýringina, sum skal taka støði í nýggjari greining av búskaparliga haldføri Føroya. Upplagt var tí, at tað samstundis varð gjørd ein greining av, hvørjar avleiðingar stytta arbeiðsvikan kann hava við sær fyri fíggjarliga haldførið í almenna geiranum.

## Skattalætti

Umframt lønarlyft og stytta arbeiðsviku hevur nýggja landstýrið eisini sett sær fyri at veita ein munagóðan skattalætta til tey, ið eru lág- ella miðallønt. Onki ítøkiligt er tó higartil sagt um henda skattalættan, annað enn at hann skal vera fult fíggjaður. Kommunufelagið hevur tó fingið váttan frá landsstýrinum um, at kommunuskatturin verður ikki ávirkaður.

## Hendingar í árinum

# Grannaósemja um hegnskyldu var ikki eitt mál fyri kommununa

Nakrir grannar vóru ikki á einum máli um, hvussu hegnskyldan millum ognir teirra skuldi skiljast. Lendið var soleiðis, at onkur granni mátti gera eina munandi íløgu í ein garð/stuðlamúr millum grundstykkini, um ætlaða byggingin á stykkinum skuldi gerast veruleiki. Spurningurin fyri grannarnar var serliga, í hvønn mun teir skuldu átaka sær ein lut í kostnaðinum fyri hetta arbeiðið – og hvør leikluturin hjá kommununi var.

Kommunan vendi sær tí til skrivstovuna, sum kannaði viðkomandi skeyti. Tað vísti seg, at allir grannarnir høvdu ávísa hegnskyldu, sum var tinglýst servitutbindandi á ognina. Og grannarnir høvdu sonevndan átalurætt mótvegis hvørjum øðrum. Í stuttum merkir hesin, at granni 1 kann krevja av granna 2, at granni 2 livir upp til ta hegnskyldu mótvegis granna 1, sum er ásett í skeytinum hjá granna 2.

Skeytini vóru ikki heilt líka, men í teimum øllum var eisini ein ávís skylda mótvegis kommununi. Kommunan skuldi geva loyvi til tey hegn, sum ætlandi skuldu setast upp. Kommunan kundi í hesum sambandi taka ymisk atlit, sum tó øll høvdu tilknýti til dámin í økinum, og/ella hvussu hegnið ávirkaði útsýnið hjá grannunum í økinum. Kommunan hevði tí eisini átalurætt í mun til hegnskylduna.

Kommunan hevði ikki mark til tað økið, har stuðlamúrurin skuldi gerast. Skrivstovan metti tí, at ásetingarnar um hegnskyldu máttu skiljast soleiðis, at ósemjur um slag av hegni, og hvussu kostnaðurin skuldi býtast, var eitt mál millum grannarnar. Kundu grannarnir ikki semjast, var hetta í evsta føri eitt mál fyri dómstólarnar at taka støðu til.

Kommunan hevði tískil onga heimild at taka dagar ímillum, hvørja skyldu grannarnir høvdu mótvegis hvørjum øðrum. Og tí átti kommunan heldur ikki at taka støðu til, hvussu hegnskyldan skuldi tulkast millum grannarnar.

Men kommunan hevði kortini ein leiklut at vegleiða um, hvørji krøv kommunan ætlaði at seta fyri at verja tey atlit, sum kommunan eftir skeytunum hevði rætt at taka.

Skrivstovan vísti á, at kommunan til dømis kundi uppfylt hesa vegleiðingarskyldu við at bjóða viðkomandi grannum til ástaðarfund, har kommunan greiddi frá sínum leikluti í málinum.



# 4. Vælferðarøkini

## Barnaøkið

Nýggja samgongan hevur – sum vanligt er – gjørt ymsar broytingar í aðalráðunum. Ein av broytingunum er, at eitt nýtt aðalráð fyri barna- og útbúgvingarøkið er sett á stovn. Hetta skal viðvirka til at samskipa átøk á barnaøkinum, ið krevja eina tvørgangandi tilgongd.

Í hesum sambandi skrivaði formansskapurin í Kommunufelagnum, saman við landsstýrisfólkunum í barna- og útbúgvingarmálum, almanna- og mentamálum, heilsumálum og løgmálum, undir eitt semjuskjal um at virka í felag fyri at finna loysnir, sum kunnu sameina tænastur, sum verða veittar børnum og ungum.

Málið er at laga niður forðingar, sum kunnu vera millum ymsu skipanirnar, tá tørvur er á at tryggja sameindar og samskipaðar tænastur til børn og ung. Visiónin er, at Føroyar skulu verða tað besta staðið í heiminum hjá øllum børnum og ungum at vaksa upp í. Øll børn og ung skulu hava tryggar og góðar karmar, sum tey mennast og mentast í, til tess at tey blíva heil menniskju, sum kunnu virka í einum rúmligum demokratiskum samfelagi, har øll trívast.

Arbeiðið verður skipað sum ein verkætlan undir Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Í næstum verður ein verkætlanarleiðari settur, og ein verkætlanarlýsing orðað, sum partarnir skulu góðkenna.

Sambært samgonguskjalinum eru eisini fleiri lógarbroytingar í væntu á barnaøkinum, sum beinleiðis hava við kommunal ábyrgdarøki at gera.

Samgongan hevur millum annað sett sær fyri at dagføra barnaverndarlógina og at betra um arbeiðsviðurskiftini hjá fosturfamiljum. Somuleiðis skal ein landsætlan gerast fyri barnaverndarmál, eins og landsstýrið vil styrkja samstarvið við Barnaverndarstovuna. Samgongan ætlar eisini at dagføra dagstovnalógina, umframt at gera broytingar í fólkaskúlalógini. Og innan serøkið hevur landið sett sær fyri at eftirmeta leiklutin hjá Sernámi á dagstovnaøkinum, so at uppgávubýti og fígging fylgjast. Alt hetta kann væntast at ávirka kommunurnar í størri og minni mun.

Enn er lutfalsliga stutt frá liðið, síðani samgongan tók við, og tí er lítið ítøkiligt komið á borðið enn. Greitt er tó, at Kommunufelagið fer at fylgja hesum arbeiði tætt. Bæði fyri at tryggja at lógargrundarlagið er arbeiðsligt hjá kommununum, men somuleiðis at samsvar verður millum vald og gjald á ymsu økjunum.

Dagstovnaráðið, sum er skipað sambært dagstovnalógini, handaði í februar 2023 sítt tilmæli til Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið. Mælt verður millum annað til, at Kommunufelagið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið í felag gera eina heildarætlan fyri dagstovnaøkið. Eina heildarætlan, sum vísir hvørji neyðug

stig kunnu takast at tryggja tilgongd av útbúnum starvsfólkum, og tryggja starvsfólkum og børnum góðar umstøður á dagstovunum.

Eisini verður mælt til, at kommunurnar stovnseta eina felags eind undir Kommunufelagnum, sum kann standa fyri og samskipa felags menning av økinum.

# Eldraøkið

Hóast eldraøkið er ein ovurhonds stór avbjóðing, so er lítil ivi um, at kommunurnar eru tann myndugleikin, sum við røttu fyritreytunum er best førur fyri at veita borgaranum bestu tænastuna. Tí er avgerandi spurningurin ikki, hvørt økið skal liggja hjá kommununum ella ikki, men heldur, at vit sum felagsskapur fáa neyðugu fyritreytirnar upp á pláss, m.a. tá ið tosað verður um fígging og ógreitt ábyrgdarbýti.

Samgongan hevur í samgonguskjalinum bundið seg til – í samráði við kommunurnar – at áseta endaligu markamótini millum land og kommunur fyri fólk, sum eru undir 67 ár og hava serligan tørv og varandi sjúku, og sum í dag detta niður ímillum skipanirnar. Harumframt verður sagt, at tilmælini í eftirmetingini av eldraøkinum frá 2021, nú skulu viðgerast saman við kommununum, og síðan seta tað í verk, sum semja kann fáast um.

Hesum tekur Kommunufelagið fult undir við, og felagið fer av heilum huga undir samráðingarnar. Tað er ongin ivi um, at eldraøkið verður stóra avbjóðingin hjá kommununum frameftir. Eisini er tað greitt, at talan er um avbjóðing, ið kommunurnar ikki sjálvar kunnu loysa, tí lóggáva má til. Semja má finnast bæði um uppgávubýtið og um framtíðar fíggingina av eldraøkinum. Úrslitið av hesum samráðingum má sigast at verða av avgerandi týdningi fyri kommunurnar frameftir.

### KOMMUNURNAR FINGIÐ HEIMILD AT ÁSETA GJØLD Á ELDRAØKINUM

Við kunngerðarbroyting tann 30. januar í ár varð skipanin viðvíkjandi gjøldum á eldraøkinum umsíðir broytt, soleiðis at kommunurnar nú sjálvar kunnu áseta gjøldini fyri búpláss, umlætting og heimahjálp. Hetta hevur havt við sær, at gjøldini vórðu dagførd frá 1. apríl 2023.

Higartil hevur verið galdandi, at gjøldini fyri búpláss, umlætting og heimahjálp hava verið ásett beinleiðis av landsstýrismanninum í kunngerð. Men nú verður skipanin broytt, soleiðis at kommunurnar sjálvar skulu áseta eitt mestagjald, meðan landsstýrismaðurin ger av, hvussu stórur avsláttur skal veitast í mun til inntøku borgarans.

Tá eldraøkið var hjá landinum, vórðu gjøldini dagførd á hvørjum ári, men síðan kommunurnar yvirtóku økið, hevur ongin áhugi verið frá landsstýrisins síðu at dagføra gjøldini. Gjøldini hava tí verið óbroytt síðan 2014. Inntøkurnar hava tí eisini staðið í stað á góðum 50 mió. kr. árliga.

Hóast hvørt eldraøki sær nú kann áseta síni egnu gjøld, hava kommunurnar gjørt sínámillum semju um, at øll átta eldraøkini taka somu gjøld frá 1. apríl. Semjan ber í sær, at gjøldini hækkaðu við 15% frá 1. apríl 2023. Hetta má sigast at vera ein lutfalsliga lítil hækking, tí síðan gjøldini síðst vóru ásett, eru sáttmálalønirnar til røktarstarvsfólkini hækkaðar við umleið einum fjórðingi. Samstundis fær miðal fólkapensjónisturin í dag útgoldið ein triðing meira um mánaðin, enn tá gjøldini seinast vóru ásett.

### GJALD FYRI FAST BÚPLÁSS Á ELDRABÚSTOVNI

Mestagjaldið hækkaði 1. apríl úr 10.538 kr. upp í 12.150 kr. um mánaðin. Mestagjaldið verður tó einans rindað av teimum heilt fáu, ið, umframt fólkapensjón og AMEG, hava eina ársinntøku omanfyri 290.000 kr. Hjá teimum, ið lítla og onga egininntøku hava, hækkaði gjaldið úr 5.686 kr. upp í 6.561 kr. um mánaðin. Fólkapensjónistur á bústovni, ið bara fær almenna pensjón, fær útgoldið góðar 13.000 kr. um mánaðin eftir skatt. Tað vil siga, at hóast gjaldið er hækkað 15%, eru framvegis umleið 6.500 kr. eftir til egna nýtslu hvønn mánað.

### GJALD FYRI UMLÆTTING

Gjaldið fyri umlætting er tað sama uttan mun til inntøku borgarans. Seinastu átta árini hevur gjaldið verið 134 kr. um samdøgrið, ella umleið 4.000 kr. um mánaðin. Frá 1. apríl 2023 hækkaði gjaldið upp í 162 kr. um samdøgrið, ella umleið 4.900 kr. um mánaðin.

### GJALD FYRI HEIMAHJÁLP

Gjaldið fyri heimahjálp er tongt at inntøkuni hjá tí, sum móttekur tænastuna. Fyrr var gjaldið fyri giftan pensjónist ásett í mun til helvtina av samlaðu inntøkuni hjá hjúnunum til samans. Men síðan 1. januar 2021 hevur inntøka hjá hjúnafelaga ikki verið roknað uppí. Gift og ógift verða nú viðgjørd eins.

Pensjónistar við inntøku niðanfyri 50.000 kr. hava ongantíð rindað fyri heimahjálp, og tað verður framvegis galdandi eftir 1. apríl. Pensjónistar, hvørs árliga inntøka er millum 50.000 kr. og 55.000 kr., hava seinastu átta árini rindað 51 kr. fyri hvønn tíma, og tað gera tey framvegis eftir 1. apríl. Sum nevnt veksur gjaldið í mun til inntøkuna. Seinastu átta árini hevur tað verið soleiðis, at tey við inntøku omanfyri 260.000 kr., rindaðu mestagjaldið, sum var 77 kr. um tíman. Frá 1. apríl hækkaði mestagjaldið upp í 204 kr. um tíman. Mestagjaldið verður tó einans rindað av teimum, ið umframt almennu pensjónina hava eina inntøku omanfyri 290.000 kr. árliga.

Tó hevur tað altíð verið soleiðis, at rindað verður í mesta lagi fyri 30 tímar um mánaðin, og hetta verður varðveitt. Tað mesta, ið nakar fer at rinda fyri heimahjálp, verður sostatt 6.120 kr. um mánaðin, og tað verður bara rindað av teimum við egininntøku omanfyri 290.000 kr., sum fáa heimahjálp meira enn 30 tímar um mánaðin.

### HEIMASJÚKRARØKT ER FRAMVEGIS ÓKEYPIS

Gjørt verður vart við, at tað er einans heimahjálp, ið rindað verður fyri. Onki gjald verður tikið fyri heimasjúkrarøkt, og tað er framvegis galdandi.

### STYRKIR ELDRARØKTINA FÍGGJARLIGA

Roknað verður við, at dagføringin av gjøldunum fer at hava eina meirinntøku við sær á 8 mió. kr. árliga. Í 2023 verður tó einans talan um 6 mió. kr., tí broytingin fekk ikki gildi fyrr enn 1. apríl, og er sostatt einans galdandi í 8 mánaðir. Tað, at gjøldini nú eru dagførd, er við til at styrkja eldraøkið fíggjarliga og at tryggja eina framhaldandi góða tænastu.



# 5. Skúli og mentan

## Eftirmeting av fólkaskúlanum

Undanfarna samgonga setti á vetri 2021 ein arbeiðsbólk at eftirmeta fólkaskúlalógina. Arbeiðsbólkurin varð mannaður við umboðum frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, Undirvísingarstýrinum, Námi, Sernámi, Kommunufelagnum, Føroya Lærarafelag, Skúlaleiðarafelagnum, Fólkaskúlaráðnum, Námsvísindadeildini og Felagnum Heim og skúli.

Orsøkin til at seta arbeiðsbólkin var sambært landsstýrismanninum, at spurningar seinastu árini vóru settir við ymisk viðurskifti í fólkaskúlanum, millum annað at skúladagurin er ov drúgvur, har næmingarnir hava fleiri undirvísingartímar um vikuna enn í hinum Norðurlondum; at kreativu lærugreinarnar eiga ov lítið pláss á tímatalvuni; og at fremmandamæltir næmingar ikki hava nøktandi undirvísingartilboð.

Somuleiðis varð víst á politiskar raðfestingar í samgonguskjalinum, har samgongan hevði sett sær fyri at gera tillagingar og broytingar í fólkaskúlalógini, herundir viðvíkjandi floksstødd, serøkinum og starvsfólkaviðurskiftum, at styrkja kreativu og handaligu lærugreinarnar, talgildu førleikarnar og málmenningina, mál- og mentanarundirvísingina hjá næmingum við fremmandum uppruna og at stuðla skrivi- og lesiveikum næmingum.

Arbeiðsbólkurin var komin væl áleiðis við sínum áliti, tá løgtingsval varð útskrivað í november 2022. Arbeiðið steðgaði tá upp á politiskum stigi, men ráðið valdi at arbeiða víðari á embætismannastigi. Nakað av virksemi var í arbeiðsbólkinum fyrstu vikurnar í 2023, men síðani kom stígur í. Kommunufelagið væntar tó, at eitt endaligt álit verður handað nýggja landsstýrismanninum innan leingi – hetta fer at fevna um nøkur, men ikki øll viðurskiftini í arbeiðssetninginum. Felagið hevur ymsar ábendingar um, hvørji tilmæli eru ávegis – millum annað um longdina á skúladegnum, og hvussu frítíðirnar hjá skúlanæmingunum verða ásettar, men enn er kortini ov tíðliga at siga nakað endaligt um hesi viðurskifti.

# Sernámsfrøði/Sernám/ Tænastan frá Sernámi

Sernám er ein landsumfatandi stovnur, sum arbeiðir við børnum og ungum í aldrinum 0-18 ár. Endamálið hjá Sernámi er at veita ráðgeving innan sernámsfrøðilig viðurskifti til dagstovnar, skúlar og foreldur.

Hóast Sernám fær játtað pening frá løgtinginum til hetta endamál, fingu allir kommunalir dagstovnar 30. august 2022 brádliga boð frá leiðsluni á Sernámi um at virksemið, orsakað av starvsfólkatroti, fór at verða niðurraðfest til aldursbólkin 0 til 7 ár.

Kommunufelagið undraðist stórliga yvir, at ein slík fráboðan, sum hevur grundleggjandi broytingar við sær fyri alt smábarnaøkið og var málrættað kommunalum stovnum, kundi koma frá einum undirliggjandi stovni hjá landsstýrismanninum til stovnar hjá kommununum, uttan nakra politiska viðgerð yvirhøvur og enn minni nakra kunning.

Sernám skal, sum staðfest er í løgtingsfíggjarlógini og sambært síni egnu endamálsorðing, veita somu ráðgeving til alt barnaøkið og ikki bara til børn yvir 7 ár.

Kommunurnar spurdu seg fyri, hvørt landsstýrismaðurin hevði givið boðini um hesa raðfesting, men staðfest varð, at landstýrismaðurin ikki var vitandi um hetta, fyrr enn eftir at brævið var sent kommunalu dagstovnunum.

Kommunufelagið góðtekur ikki, at virksemið hjá Sernámi viðvíkjandi smábarnaøkinum verður niðurraðfest á slíkan hátt, og hetta er eisini í andsøgn við øll tilmæli um, innsatsur í smábarnaárum munar best.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tíbetur somu fatan, og í løtuni verður eitt arbeiði gjørt við umboðum fyri kommunala geiran og ráðið, sum skal lýsa neyvari, hvørja tænastu Sernám skal geva øllum børnum í Føroyum uttan mun til, um tey eru eldri ella yngri enn 7 ár.

# Undirvísing í føroyskum máli og føroyskari mentan fyri útlendingar

Í nógv ár hevur undirvísing av tilflytarum í føroyskum máli og mentan verið skipað innan karmarnar av lóg um serstaka frítíðarundirvísing. Tann skipanin heimilar at skipa fyri serstakari frítíðarundirvísing fyri allar íbúgvar yvir 14 ár.

Tørvurin á skipaðari undirvísing í føroyskum sum annaðmál er vaksin rættiliga nógv seinnu árini sum avleiðing av, at talið av tilflytarum er vaksið nógv, og at talið av børnum, ungum og vaksnum, sum ikki hava føroyskt sum fyrsta mál, er vaksið nógv. Í veruleikanum er virksemið vaksið so mikið, at tað rúmast illa innan karmarnar hjá kvøldskúlaskipanini.

Tí hevur Barna- og útbúgvingarmálaráðið verið í dialogi við Kommunufelagið um at fáa í lag eina nýggja landsumfatandi skipan við málskúla fyri tilflytarar. Ætlandi verður í næstum orðað ein løgtingslóg um landsumfatandi málskúla fyri tilflytarar, sum Kommunufelagið sjálvsagt eisini fær til hoyringar.

# Bókasavnsøkið

Í løtuni liggur uppskot til nýggja bókasavnslóg í løgtinginum. Uppskotið var ávegis undir seinastu samgongu, men landsstýrið náddi ikki at leggja uppskotið fram, áðrenn val var útskrivað. Nú hevur landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum lagt uppskotið fyri tingið.

Galdandi lógargrundarlag er frá 2005, men við jøvnum millumbilum hava verið ætlanir um at broyta verandi lóg.

Landið hevur sum heild givið bókasavnsøkinum vánaligar sømdir seinnu árini. Fyri 25 árum síðani læt landið 60% í studningi til bókasøvn. Frá 2005 varð hetta lækkað til í mesta lagi 40 %. Í dag er veruleikin tann, at stuðulin hjá landinum bert telur umleið 15% av samlaðu játtanini hjá fólkabókasøvnunum. Ítøkiliga játtanin til økið er 18.307.850 kr., harav landsins partur bert er 2.884.000 kr. Allur framburður og øll menning á fólkabókasavnsøkinum seinastu 20 árini hava sostatt verið fíggjað av kommunukassunum.

Í lógarfyrireikandi arbeiðinum hevur Kommunufelagið mælt til, at kommunurnar taka fulla ábyrgd av økinum. Kommunufelagið er komið við fleiri uppskotum til, hvussu hetta kundi verið gjørt fíggjarliga, men landsstýrið vil framhaldandi hava eina skipan við eini stuðulsjáttan. Sambært uppskotinum er ætlanin nú, at stuðulin verður játtaður sum verkætlanarstuðul.

Kommunufelagið heldur, at ætlanirnar hjá landsstýrinum at broyta verandi stuðulsjáttan til okkurt annað slag av stuðulsjáttan, sum er akkurát líka fyrisitingarliga tung, eru høpisleysar. Í frægasta føri fer hendan játtanin at standa í stað, í ringasta føri verður hon brúkt til annað endamál enn at menna bókasøvnini lokalt.



# 6. Umhvørvi og vinna

## Eftirmeting av reglugerð um óljóð

Í januar 2022 kom nýggja reglugerðin um óljóð frá skipum í gildi. Hetta varð gjørt eftir umfatandi ljóðkanningar á havnarløgum, grannaløgum og inni í privatum bústøðum. Til samans 273 kanningar vórðu gjørdar, og burturúr hesum bar til at gera eftirfarandi hagfrøðiligar greiningar sum fakligt grundarlag at seta mørk fyri óljóði frá skipum.

Sambært reglugerðini skulu skip ikki sleppa í føroyska havn, um tey bróta markvirðini og ikki innan í mesta lagi 6 mánaðir megna at fáa viðurskiftini í rættlag.

Eftirmetingin tók støði í 82 nýggjum mátingum av til samans 50 ymiskum skipum. Fyri trý skip var ljóðstøðið so høgt, at tey longu í 2022 fingu bann at koma í føroyska havn. Og 1. juli 2023 leggjast 8 nýggj skip afturat hesum lista, um tey ikki gera munagóðar ábøtur áðrenn tað.

Longu á sumri 2022 varð so smátt farið undir at eftirmeta reglugerðina og markvirðini saman við táverandi Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, Umhvørvisstovuni og umboðum fyri kommunala havnarnetverkið. Hetta arbeiðið varð liðugt um ársskiftið.

Eftir politiska viðgerð á borgarstjóra- og stýrisfundum fyrst í 2023 gjørdi Kommunufelagið við støði í reglugerðini av at gera nakrar broytingar og tillagingar í reglugerðini. Broytingarnar og tillagingarnar eru í høvuðsheitum hesar:

- Reglugerðin hevur fingið nýtt heiti: Felagskommunala havnarreglugerðin.
- Nýggjar ásetingar eru um, hvussu klagur um royk skulu verða viðgjørdar.
- Nýggjar ásetingar skulu forða fyri, at skip broyta raksturin fyri at fáa lægri ljóðmáting.
- Undantøk frá reglunum kunnu eftir nærri treytum gevast til farma-/ferðafólkaskip, sum til dømis eru í fastari rutu til Føroya.
- Harumframt eru aðrar smærri broytingar og málsligar tillagingar gjørdar.

Nýggja havnarreglugerðin er nú galdandi í øllum kommunum, sum í síni tíð samtyktu reglugerðina um óljóð frá skipum.

# Grønar havnir

Seinastu árini er ferð av álvara komin á grøna orkuskiftið, og tað setir nýggj krøv til kommunala undirstøðukervið.

Nógv tann størsti parturin av heimshandlinum – umleið 90% – fer fram sjóvegis, og líkt er ikki til, at hetta fer at broytast í komandi árum. Farmaskip kring heim elva longu til umleið 3% av samlaða útlátinum av vakstrarhúsgassum, og tað er ein lutur, sum væntast at fleirfaldast komandi áratíggjuni, um onki verður gjørt.

Eisini maritima vinnan hevur tí í fleiri ár verið undir stórum trýsti at minka um nýtsluna av tungolju og útláti av vakstrarhúsgassum. Hetta hevur havt við sær eina menning av alternativum til tungoljuna, herundir LNG (liquefied natural gas), ammoniakk, vetni og el. Innan skipsverkfrøðina eru somuleiðis áhugaverdar royndir gjørdar fyri at minka um mótstøðuna, tá ið skipið ferðast gjøgnum sjógvin, við eitt nú at broyta skapið á kjøli og stevni ella gera royndir við at blása luft undir kjølin. Farið er eisini aftur á gamlar gøtur fyri at minka um oljunýtsluna, tí royndir verða eisini gjørdar við seta segl aftur á skipini.

Menningin á økinum leggur eisini trýst á veitarar hjá vinnuni. Og her hava havnirnar ein týðandi leiklut.

Seinastu árini hava kommunurnar fingið fleiri – formligar og óformligar – áheitanir frá bæði borgarum og umboðum fyri vinnuna um at seta ferð á útbreiðsluna av landstreymi til skip. Nú hevur nýggja landsstýrið eisini sett sær fyri at finna eina loysn upp á at útvega skipum landstreym. Hendan loysnin skal sambært samgonguskjalinum finnast saman við kommununum og SEV.

Hetta er tó ein ógvuliga samansettur trupulleiki, sum neyvan hevur funnið nakra upplagda loysn enn. Høvuðstrupulleikin er helst kostnaðurin. Íløgan í at leggja káplar og at gera og viðlíkahalda útbúnað á havnunum er í dag so stór, at hon ikki er nóg kappingarfør við elframleiðsluna umborð á skipunum. Við møguligum undantaki av teimum heilt fáu førunum, tá ið oljuprísurin er óvanliga høgur, er tað heilt einfalt bíligari at framleiða ein kilowatt-tíma umborð, enn tað er at keypa hann frá einari landstreymsskipan.

Hetta er ein stór avbjóðing, tí bæði vinnan og havnirnar eru í bæði innanhýsis og altjóða kapping. Kommunurnar hava avgjørt ein leiklut at loysa hendan knútin, men yvirskipaði trupulleikin hevur altjóða dám og snýr seg grundleggjandi um at fáa allar partar at flyta seg á somu leið. Tí má landsstýrið taka á seg samskipandi leiklutin á hesum øki – í góðum samstarvi við borgararnar, vinnuna, SEV og kommunurnar.

# Felags renovatiónsskipan

Stórar útbyggingar á renovatiónsøkinum standa fyri framman. Vøksturin í burturkastnøgdunum er áhaldandi, og bæði KB og IRF hava tí fyri neyðini at gera stórar íløgur í nýggjar brennistøðir komandi árini.

Allar kanningar higartil hava víst, at stórir fíggjarligir og umhvørvisligir fyrimunir eru í at leggja renovatiónina í eitt felag og byggja eina brennistøð fyri alt landið. Fyri nøkrum árum síðani var eisini ítøkiligt uppskot frammi um at leggja brennistøðurnar saman, men av ymiskum orsøkum var ikki komið á mál.

Avgjørt er nú at taka hetta málið upp aftur. Avgerðin varð tikin á borgarstjórafundi í Kommunufelagnum tann 12. januar í ár.

Í løtuni verður arbeitt við at lýsa og greina umstøðurnar hjá KB og IRF. Tá ið hetta arbeiðið er liðugt, verða borgarstjórar kallaðir inn til nýggjan fund.

Hóast stórar avbjóðingar liggja fyri framman, og hóast stórar avgerðir skulu takast rímiliga skjótt, eru øll samd um, at málið og øll viðurskifti skulu lýsast til fulnar.

# Elorkuøkið

Tann 22. mars 2022 skrivaðu umboð fyri Kommunufelagið, SEV og landsstýrismaðurin í orkumálum undir eitt semjuskjal um bygnaðin á elorkuøkinum í framtíðini.

Í semjuskjalinum var lagt upp til, at tað á fleiri mótum verður gjørt eitt arbeiði í felag millum orkumyndugleikan og SEV.

Nógv av hesum arbeiðinum er farið í gongd.

Høvuðsinnihaldið í semjuni var, at SEV framhaldandi skuldi vera eigari, reka og hava ábyrgd av føroyska elkervinum. SEV skuldi varðveita rættin at bjóða á jøvnum føti við onnur upp á varandi orkuframleiðslu.

Ongin endalig støða varð tikin til sølupartin, men partarnir vóru samdir um at seta ein felags bólk at greina, hvussu marknaðurin kann verða skipaður á einfaldan og ódýran hátt.

Hesin bólkurin við umboðum fyri orkumyndugleikan og eigararnar hjá SEV verður settur í næstum.

# Oljutangar, spillivatn og grundvatn

Hin 1. januar 2022 gekk freistin út hjá kommununum at skráseta allar oljutangar sambært tí kunngerð, sum varð sett í verk í 2018. Tá ið freistin var úti, vóru fleiri kommunur komnar væl áleiðis, meðan aðrar høvdu langt á mál.

Kommunufelagið hevur leingi roynt at fingið undirtøku fyri at strika skylduna hjá kommununum at skráseta oljutangar. Hetta hava vit grundað á, at vit í Føroyum hava tveir veitarar av olju, og hesir vita neyvt, hvar nærum allir tangar eru staðsettir – heilt niður á knattstøður. Mest nærliggjandi er tí, at ein skráseting fer fram millum oljufeløgini og Umhvørvisstovuna.

Vit hava eisini funnist at, at skráseting av oljutangum ikki er egnað til røkka endamálinum við kunngerðini, sum er at fyribyrgja oljudálking. Vit hava víst á, at fleiri dømi eru um, at tað hevur verið ómetaliga trupult at finna kelduna til ein oljuleka – eisini hóast allir tangar í økinum eru skrásettir. Royndirnar vísa sostatt, at oljan setir seg ígjøgnum lendið, kann ferðast eftir hellu, gjøgnum rivur og leiðingar og kann tí elva til oljulukt langt burturi frá kelduni til lekan. Felagið hevur boðað landsstýrinum frá hesum og hevur mælt til, at kunngerðin verður endurskoðað.

Ein onnur kunngerð, har freistin er komin, er kunngerðin um spillivatn. Eftir hesari skuldu kommunurnar vera lidnar við sínar spillivatnsskipanir í 2015. Ein røð av kommunum eru komnar á mál við hesum, meðan øðrum vantar nakað ella nógv á mál.

Kommunufelagið hevur samskift við landsstýrið um hetta og greitt frá, at talan ofta er um ógvuliga stórar og kostnaðarmiklar verkætlanir, sum fyri einstakar kommunur fevna um nógvar bygdir.

Landsstýrið hevur eins og kommunurnar áhuga í, at kommunurnar koma á mál við arbeiðinum. Avrátt varð tí í fyrstu atløgu, at landið skuldi savna inn til eina støðulýsing við at spyrja allar kommunurnar um spillivatnsætlanir teirra. Kommunufelagið er til reiðar at tosa við landsstýrið um, hvat síðani skal henda.

Á umhvørvisøkinum er eisini vert at nevna lógaruppskotið um grundvatn, sum var ávegis í 2022 og sum nú liggur í tinginum. Ætlanin er í stuttum at staðfesta, at grundvatn er ogn hjá landinum, og at áseta nakrar aðalreglur fyri, hvussu grundvatn kann verða gagnnýtt til veitingar, orku, vinnulív o.a. Kommunufelagið hevði eina røð av viðmerkingum til uppskotið, og nakrar av hesum eru tiknar til eftirtektar. Enn eru tó viðurskifti, sum eftir okkara tykki eiga at verða broytt, og hetta fara vit at vísa á, tá ið vit væntandi verða kallað inn til hoyringar í løgtinginum.

# Býarskipan, bygging og lendisætlan

Undanfarna samgonga setti sær fyri at gera ymsar broytingar í býarskipanarlógini og setti seg miðskeiðis í 2022 í samband við Kommunufelagið hesum viðvíkjandi. Talan er um eina lóg, sum er frá 1954, og sum síðani er broytt í nøkrum umførum.

Felagið tók upp samband við teknisku leiðslurnar í kommununum um málið, og greitt varð, at tað í kommunalu umsitingunum var bæði ynski og tørvur á grundleggjandi dagføringum av lógini.

Samskiftið við landsstýrið kom ikki rættiliga upp á politisk stig, áðrenn valið varð útskrivað, men fáar ábendingar vóru um, at táverandi landsstýri var sinnað at gera stórar broytingar í lógini. Ógreitt er, um hetta málið verður tikið fram aftur undir nýggja landsstýrinum.

Nýggja landsstýrið hevur í sínum samgonguskjali sett sær fyri at tillaga byggireglugerð og -lóggávu til føroysk viðurskifti. Felagið hevur ikki enn fingið innlit í, hvørjar ítøkiligu ætlanirnar eru, men greitt er, at hetta fer at ávirka bygging og byggimálsviðgerð í kommununum. Kommunufelagið fer tí at raðfesta hetta arbeiðið, tá ið landsstýrið setir tað í verk.

Fyri nýggja landsstýrinum hevur felagið endurtikið, at tørvur eisini er á einari lendisætlan fyri Føroyar. Vit mugu hava eina fakliga grundaða og politiskt kjølfesta ætlan fyri, hvussu útbyggingin av landinum skal fara fram komandi nógvu árini. Hetta krevur, at støða verður tikin til, hvar bústaðarbygging skal vera, hvar orkuútbyggingar skulu loyvast, hvar havnirnar skulu mennast, hvar fríøkini skulu vera og so framvegis.

Felagið hevur frá skiftandi landsstýrum fingið ábendingar um, at landið sær týdningin í hesum arbeiði. Vit vóna tí, at hetta nýggja landsstýrið fer at raðfesta at fremja lendisætlanina í verki.

# Tóm hús

## KOMMUNURNAR FÁA NÚ HEIMILD AT ÁLEGGJA TÆNASTUGJALD OG BÚSTAÐARSKYLDU

Kommunurnar hava fleiri ferðir víst á avbjóðingarnar við mongu tómu húsunum kring landið. Kommunufelagið hevur nú í nógv ár gjørt skiftandi landsstýri vart við, at okkurt má verða gjørt.

Serliga hava kommunurnar víst á, at tær mangla amboðini til at bøta um trupulleikan. Tey amboð, ið kommunurnar hava víst á, eru heimild at áleggja bústaðarskyldu í ávísum økjum og heimild at leggja tænastugjald á sethús, har ongin hevur fastan bústað. Tí er tað at fegnast um, at tað í samgonguskjalinum hjá nýggju samgonguni stendur:

> *Heimild verður latin kommunum at taka hóskandi gjald fyri tænastuveitingar til húsaeigarar, sum ikki búgva í kommununi, og at áseta bústaðarskyldu í sambandi við nýggjar kommunalar byggiætlanir.*

Tað má sigast at vera í tøkum tíma, at okkurt verður gjørt við málið. Tí talið av tómum húsum er støðugt vaksandi, og er nú vorðið rættiliga stórt. Serliga ger tað seg galdandi uttan fyri miðstaðarøkið, men sjálvt í Havn eru fleiri tómir bústaðir. Talan er um hús, ið ikki eru tøk til langtíðar útleigu, og sum tí eru at meta sum frítíðarhús. Eigarar eru ofta fólk, ið ikki eru skrásett at búgva í kommununi, og tey rinda tí ikki skatt har.

Tøl vísa, at næstan 15% av sethúsunum uttanfyri Tórshavnar kommunu standa tóm. Í smáu kommununum standa vanliga millum 30% og 50% av húsunum tóm. Í Suðuroy stendur fimtahvørt hús tómt, og í Sandoy næstan triðjahvørt.

Fyrr var soleiðis, at flestu tómu húsini vóru ogn hjá fólki, sum vóru flutt burtur, ella sum vóru uppvaksin á staðnum, og síðani høvdu arvað húsini. Eigarar vóru sostatt í flestu førum fólk við tilknýti til bygdina; tey vóru ein partur av felagslívinum, og við til at halda bygdini uppi, hóast tey ikki vóru fastbúgvandi. Seinastu árini hevur verið ein onnur gongd, har nógv hús í smærru bygdunum verða seld fólki til frítíðarhús, ofta við ætlan um at leiga út til ferðafólk ein part av árinum. Tøl frá Hagstovuni vísa, at sølan av húsum í smærru bygdunum er støðugt vaksandi, og er meiri enn tvífaldað seinastu 10 árini.

At sethús standa tóm í einari bygd er ikki ein trupulleiki í sær sjálvum, um talið er avmarkað í mun til samlaða talið av húsum. Men verður talan um ein lutfalsliga stóran part av sethúsunum, skal kommunan rinda kostnaðinum av einum undirstøðukervi, sum er væl størri enn neyðugt til tey fastbúgvandi fólkini.

Høvuðsorsøkin til stóra talið av tómum húsum er tann støðuga flytingin frá smærri bygdum til stórpláss, sum hevur verið í meira enn ein mansaldur. Gongdin hevur havt við sær, at serliga smærru bygdirnar uttan fyri miðstaðarøkið í størri ella minni mun eru vorðnar til partvís summarhúsøki.

Heldur gongdin fram, fara helst fleiri bygdir tíverri at verða avfólkaðar komandi árini. Tað er tí uppgávan hjá myndugleikunum – landi og kommunum – at tryggja, at mongu tómu húsini ikki gerast ein áhaldandi og vaksandi eykakostnaður fyri ávísar kommunur.

### Hendingar í árinum

# Brævið kom retur

Kommunan hevði brævaskifti við ein borgara um eitt ítøkiligt mál. Í hesum sambandi hevði kommunan sent tvey innskrivað brøv, sum bæði komu aftur, tí eigarin – sambært upplýsingum frá Posta – ikki vildi taka ímóti brøvunum. Spurningurin var tí, hvussu kommunan skuldi fyrihalda seg til hetta.

Skrivstovan upplýsti, at kommunan sum sendari hevur próvbyrðuna í slíkum málum. Kommunan skal kunna prógva, at brævið er sent, og at tað er komið fram. Hinvegin er onki krav um, at móttakarin skal hava fingið kunnleika til innihaldið í brævinum.

Í tann mun borgarin meira ella minni aktivt velur at halda seg ókunnugan um brøvini frá kommununi, so kann próvbyrðan eftir umstøðunum verða lyft. Í slíkum førum eigur kommunan tó at tryggja tey prógv, sum eru gjørlig at tryggja um postgongdina, og annars gera notat um onnur viðkomandi viðurskifti, ið ikki kunnu verða skjalprógvað á annan hátt.



## TÆNASTUGJALD

Sum nevnt kemur avbjóðingin, tá talið av tómum húsum gerst ov stórt í mun til samlaða húsatalið í bygdini. Upplagt er tí at áseta, at treytin fyri at ein kommuna kann áseta tænastugjald í einari bygd er, at talið av tómum húsum í bygdini er lutfalsliga stórt. Ilt er at siga neyvt, hvar markið skal setast, men til dømis kundi verið sett sum treyt, at í minsta lagi 1/5 av samlaðu sethúsunum standa tóm. Sum tóm hús í hesum sambandi eru at rokna hús, har ongin er skrásettur at búgva sambært fólkayvirlitinum. Standa fólk at búgva í húsunum, til dømis tí tey verða langtíðarútleigað, eigur onki tænastugjald at verða rindað.

Gjørt verður vart við, at tað er talið av tómum húsum í einstøku bygdunum, ið er avgerandi, og ikki samlaða talið í kommununi samanlagt. Tað vil siga, at hevur ein kommuna tríggjar bygdir, og talið av tómum húsum er omanfyri markið í tveimum teirra, so fær kommunan heimild at áleggja tænastugjald, men bara í teimum báðum bygdunum.

Men tað eigur ikki at verða eitt krav, at kommunan áleggur tænastugjald, hóast talið av tómum húsum er stórt. Talan eigur at vera um eina heimild, sum kommunustýrið sjálvt kann velja at brúka. Tað ber eisini til at hugsa sær, at kommunan áleggur tænastugjald í einari bygd og ikki eini aðrari, hóast báðar hava nógv tóm hús, um so er, at viðurskiftini tala fyri hesum. Eisini kann hugsast, at tænastugjaldið verður ymiskt í teimum ymisku bygdunum í kommununi, um viðurskiftini tala fyri tí. Tað er ið hvussu er týdningarmikið, at heimildin verður orðað soleiðis, at kommunustýri kunnu vísa fyrilit fyri umstøðunum í einstøku bygdunum.

Einfaldasta loysnin er tann, at kommunurnar sjálvar áseta gjaldið innanfyri eitt hámark, ásett av løgtinginum. Ilt er at meta neyvt um, hvat eitt slíkt hámark skuldi verið.

## BÚSTAÐARSKYLDA

Skrivstovan hjá Kommunufelagnum hevur í fleiri ár javnan fingið fyrispurningar um, hvørjar møguleikar føroyskar kommunur hava fyri at áleggja bústaðarskyldu. Fyrispurningar koma bæði um verandi bústaðarøki og um ætlaðar útstykkingar, og felags fyri teir er, at kommunurnar antin ynskja ella forvitnast um bústaðarskyldu sum bústaðarpolitiskt amboð.

Í Føroyum hava vit ongar lógarásetingar um bústaðarskyldu. Tí stendur tað sum útgangsstøði eigaranum av einum bústaði frítt, um bústaðurin verður nýttur til fastan bústað ella ikki. Eigarin kann heldur ikki krevjast at leiga bústaðin út, tí stendur honum eisini frítt at lata bústaðin standa tóman.

Her er sostatt talan um eitt øki, har lógarásetingar í stóran mun vanta. Tí er tað gott, at landsstýrið umsíðir fer undir at regulera hesi viðurskiftini.

Ein greining hjá Kommunufelagnum vísir, at tað er ein røð av viðurskiftum, sum støða má takast til, áðrenn bústaðarskylda verður ásett.

Í fyrstu atløgu er neyðugt at allýsa, hvat bústaðarskylda í roynd og veru er – hvør er skyldan; er hon varandi ella tíðaravmarkað; skal hon ásetast í skeyti, byggisamtykt ella lóg; hvørji eru undantøkini; og hvørjar eru avleiðingarnar, tá ið hon ikki verður hildin?

Eisini má verða gjørd ein skilmarking millum heilárs- og frítíðarbústaðir, eins og vit kenna tað frá øðrum londum. Hóskandi kundu heilársbústaðir fingið álagt bústaðarskyldu, meðan frítíðarhús kundu fingið álagt tænastugjald – og væl at merkja bert í teimum kommunum, sum vilja seta hesa skipan í verk.

## SKATTUR FRÁ HÚSALEIGU FELLA TIL KOMMUNUNA, HAR BÚSTAÐURIN ER

Tað eru tveir hættir at skatta leiguinntøku, alt eftir um talan er um útleigu í stutta ella langa tíð.

Verður útleigað í langa tíð (minst 3 mánaðir) ber til at velja ta lagaligu bruttoskattaskipanina. Tá eru fyrstu 100.000 kr. av bruttoleiguinntøkuni skattafríar árliga, meðan tað, sum er omanfyri 100.000 kr., verður skattað við 25%. Skatturin verður býttur við 45% til kommununa og 55% til landskassan.

Verður útleigað í stutt tíðarskeið (t.d. Airbnb), er talan um skattskylduga inntøku (B-inntøku), og nettoinntøkan verður løgd saman við teirri inntøku, ið skattgjaldarin annars hevur. Rindaður verður síðan vanligur lands- og kommunuskattur av inntøkuni.

Í báðum førum fellur skatturin til kommununa, har skattgjaldarin stendur at búgva sambært fólkayvirlitinum.

Skattainntøkurnar frá langtíðarútleigu hava ongantíð verið stórar, og síðan undanfarna samgonga hækkaði árliga frádráttin úr 24.000 kr. upp í 100.000 kr., eru tær minkaðar niður í lítið og onki. Í 2020 var einans talan um 650.000 kr. samanlagt fyri allar kommunur. Annars vóru inntøkurnar vanliga umleið 2,5 mió. kr. samanlagt undanfarnu árini.

Men hinvegin tykist vøkstur vera í skattainntøkum frá útleigu í stutta tíð. Ferðavinnan er í menning, og tað hevur havt við sær stóra øking í útleigu í stutt tíðarskeið. Serliga skipanin Airbnb er vælumtókt. Men eisini verða hús boðin fram av kunningarstovum og av privatum beinleiðis. At leiga út til ferðavinnu er sostatt vorðin ein rættiliga stór vinna í Føroyum, og roknast má við, at vøksturin í stutttíðarútleigu fer at halda fram komandi árini, so hvørt sum ferðavinnan mennist.

Hóast útleiga fer fram í øllum pørtum av landinum – ikki minst í Havn – so má sigast, at kommunurnar uttan fyri miðstaðarøkið fáa lítið burturúr, tá tað kemur til skattin av leiguinntøku, tí tað kemur nógv oftari fyri, at fólk í miðstaðarøkinum leiga út hús í útjaðaranum, enn at fólk í útjaðaranum leiga út í miðstaðarøkinum. Hetta kann hava við sær, at kommunurnar í útjaðaranum, sum veita undirstøðukervið til bústaðirnar, í fleiri førum fáa millum lítið og onki av skattainntøkunum frá útleigu av hesum bústøðum.

Kommunufelagið hevur leingi víst á hesi viðurskifti fyri skiftandi landsstýrum. Tí er tað at fegnast um, at tað í samgonguskjalinum hjá nýggja landsstýrinum stendur at: "Skattur fyri útleigu skal falla til kommununa, har útleigað verður".

Mett verður, at ein slík broyting í skatti av húsaleigu, saman við einum tænastugjaldi, kann hava við sær, at avbjóðingin við mongu tómu húsunum minkar munandi, tí nú verða hesi hús ikki longur bara ein útreiðsla fyri kommunurnar, men eisini ein inntøka.

# 7. Annað virksemi í húsinum

Undir Kommunufelagnum er eisini annað virksemi, sum stutt verður greitt frá niðanfyri.

## Barnaverndarstova Føroya

Børn upp til 18 ár hava krav upp á umsorgan og rætt til tryggan uppvøkstur. Hetta er ábyrgdin hjá foreldrunum. Tá foreldur í styttri ella longri tíð ikki megna hesa ábyrgd, skal barnaverndin hjálpa. Barnaverndarstovan virkar fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í Føroyum. Hetta við at veita faklig tilmæli og ráðgeving til barnaverndartænasturnar kring landið, sum hava ábyrgd av at tryggja hjálp ella stuðul til hvørt einstakt barn. Harumframt umsitur Barnaverndarstovan Fosturforeldraskipanina og Barnahúsið. Talið á barnaverndarmálum í 2022 var 874 mál, sum á leið er á sama stigi sum undanfarin ár.

Undir løgtingsvalstríðnum vísti seg, at fleiri valevni tóku fram bæði barnaheim og Fosturforeldraskipanina og vístu á, at tað hevði skund at bøta um umstøðurnar hesum viðvíkjandi. Hetta sæst eisini aftur í samgonguskjalinum, har ásett er, at barnaverndarlógin skal dagførast, og at arbeiðsviðurskiftini hjá fosturfamiljum skulu betrast. Ein landsætlan til barnaverndarmál skal gerast, og fyribyrgjandi arbeiðið kring familjuna skal styrkjast. Styrkjast skal eisini um samstarvið við Barnaverndarstovuna, og barnabústovnar skulu byggjast.

Barnaverndarstovan fegnast um, at sjóneykan verður sett á økið, og vil gera sítt til at karmarnir hjá fosturforeldrum verða betri at virka undir, herundir at skipanin um samsýning verður tryggari og støðugari. Hetta fer væntandi at gera tað munandi høgligari at skapa betri karmar til fosturbørn, umframt at tað verða børn, sum kunnu vera í fosturfamiljum heldur enn á barnabústovni. Hetta krevur sjálvsagt, at styrkt verður um Fosturforeldraskipanina.

Eins og undanfarin ár hevur Barnaverndarstovan skipað fyri kafékvøldum fyri fosturforeldur, har fakfólk hava upplegg. Her hava fosturforeldrini eisini høvi at vera saman við øðrum fosturforeldrum.

Við ársenda í 2022 vóru 94 góðkendar fosturfamiljur í Fosturforeldraskipanini, sum høvdu børn til fosturs ella umlætting, ella sum vóru til reiðar at taka ímóti børnum til fosturs ella umlætting. Í 2022 komu bert átta nýggjar umsóknir inn til Fosturforeldraskipanina um at gerast fosturfamilja. Av teimum vóru tríggjar næstringar ella onnur, sum frammanundan vóru partar av umhvørvinum hjá barninum. Eisini í grannalondum okkara sæst tað rák, at tað gerst alt truplari at fáa til vega nýggjar fosturfamiljur. Har verður grundgivið við manglandi stuðuli, manglandi forsøgni í kørmunum og manglandi uppfylging.

Barnaverndarstovan hevur eisini í farna ári skipað fyri skeiðum fyri barnaverndartænastunum innan málsviðgerð, fyrisiting og lóg. Eisini hevur Barnaverndarstovan latið úr hondum ymiskt samskiftistilfar í samstarvi við verkætlanina, "Sig frá". Í fyrra lagi ein bókling um fráboðanarskylduna hjá fakfólki. Í øðrum lagi verður løgd seinasta hond á teknifilm, tillagaður úr norskum, sum snýr seg um, hvussu barnaverndin arbeiðir, og hvussu hvør einstakur boðar barnaverndartænastum frá, tá ein stúrir um trivnað ella menning hjá barni. Eftirsum hagtøl okkara vísa, at alsamt fleiri barnaverndarmál eru, har børn hava foreldur av øðrum uppruna enn norðurlendskum, verður teknifilmurin eisini á enskum máli.

Í samstarvi við barnaverndartænasturnar hevur verið arbeitt við dagføringum av innanhýsis arbeiðsskjølum og mannagongdum.

Tá vitan ella illgruni er um, at eitt barn hevur verið fyri ágangi, og tá løgregla og/ella sjúkrahúsverk er partur av málinum, skulu barnaverndartænasturnar brúka Barnahúsið sum lið í barnafakligu kanningini. Í Barnahúsinum hittast myndugleikar fyri at tryggja eina samskipaða og tvørfakliga viðgerð við høgari góðsku. Í húsinum møtir barnið professionellum, sum eru von at tosa við børn um ágang.

Hildið verður til í leigaðum hølum í Tórshavn, sum eru serliga innrættað til endamálið. Fyri nøkrum mánaðum síðani fekk Barnahúsið uppsøgn upp á leigumálið. Arbeitt verður við at finna nýggj hóskandi høli, og vónandi fer hetta at eydnast í 2023.

1. januar komandi fyllir Barnahúsið 10 ár, og hesi árini hava partarnir gjørt sær drúgvar royndir, eins og Barnaverndarstovan í samstarvi sínum við barnahús í grannalondum fylgir við, hvørjar royndir tey gera sær. Í heilt stuttum hevur Barnaverndarstovan niðanfyri savnað saman tær fimm dagføringarnar, ið mettar verða sum neyðugar fortreytir fyri, at føroyska Barnahúsið kann veita føroyskum børnum, sum hava verið fyri ágangi og familjum teirra, eitt nútíðarhóskandi og dygdargott tilboð:

- Børn, sum hava framt ágang á børn eiga at fáa viðgerð í Barnahúsinum, tí har er bygd upp servitan og royndir, sum eru natúrligar fortreytir fyri hesum virksemi.
- Børn, sum hava verið fyri sálarligum harðskapi eiga eisini at vera málbólkur hjá Barnahúsinum, tí fylgjurnar av sálarligum harðskapi eru eins skaðiligar og tær av likamligum og kynsligum ágangi.
- Foreldur, sum hava framt harðskap móti egnum børnum, eiga somuleiðis at fáa møguleikan at fáa viðgerð í Barnahúsinum. Orsøkin er, at børnini sum oftast hava framhaldandi samband við síni foreldur, hóast tey hava verið fyri harðskapi frá teimum.

- Viðgerðin í Barnahúsinum eigur at verða víðkað frá kreppuhjálp til fullfíggjaða sálarfrøðiliga viðgerð. Tí í dag vísir tað seg oftari enn so at vera long bíðitíð at sleppa til skikkaðan sálarfrøðing – alt eftir hvar í landinum, barnið býr. Við fullfíggjaðari sálarfrøðiligari viðgerð í Barnahúsinum hevði einsháttað viðgerð verið tryggjað børnum í barnahúsmálum av fólki við serkunnleika innan økið.
- Kunningartilfar eigur at verða framleitt til børn, ung og foreldur. Hetta hevði havt við sær fyribyrgjandi ávirkan. Barnaverndarstovan hevur dyggastu vitan og royndir á økinum, og tí eigur nøktandi játtan at verða veitt til hesa uppgávu. At Barnaverndarstovan førir hagtøl á barnaverndarøkinum merkir, at hon hevur fingurin á pulsinum og fyrst sær tey rák, sum eru á økinum.

Til ber at lesa meira í ársfrágreiðingunum hjá barnaverndartænastunum og Barnahúsinum, sum liggja á bvs.fo.

Talva 1

**Barnaverndarmál við ársenda**





Nevnd og starvsfólk í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum á vitjan hjá SEV

# Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið varð skipað sum felags arbeiðsgevarafelag fyri kommunurnar í 2003. Seinni í ávikavist 2006 og 2007 gjørdust interkommunalu arbeiðsgevararnir, SEV og IRF, partar í felagnum. Soleiðis fevnir arbeiðið hjá felagnum um allan kommunala arbeiðsmarknaðin.

Kjarnuuppgávan hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum er sambært viðtøkum felagsins at samráðast við fakfeløg um sáttmálar og um lønar- og setanarviðurskifti fyri starvsfólk, ið starvast á kommunala sáttmálaøkinum. Felagið veitir eisini ráðgeving og vegleiðing til allar kommunalar arbeiðsgevarar um lønar- og setanarmál, flokkingarmál, sáttmálaspurningar og onnur arbeiðsmarknaðarmál.

### SEMING OG SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR Í 2022

Samráðingarnar við bæði Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið endaðu við semingsroynd í ávikavist januar og februar 2022.

### STARVSFELAGIÐ

Samráðingarnar við Starvsfelagið vóru í stóran mun merktar av ósemju um kostnaðin av sáttmálanum av lønarhækkanini, sum skuldi galda í tíðarskeiðinum frá 1. oktober 2021 til 2024.

Eftir drúgvar men góðar samráðingar gjørdu partarnir í januar mánaði í 2022 av at royna seming. Semingsroyndin endaði tann 13. januar við lønarhækkanum, sum vóru settar saman í prosentum og krónum soleiðis:

- Tann 1. januar 2022 hækkaðu lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækkaðu lønirnar á lønarstigunum 1-20 við kr. 740 og á lønarstigunum 21-50 við kr. 540
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,75%

Partarnir hava í samansetingini av lønini lagt dent á at raðfesta hægri lønarhækkan til lægst løntu bólkarnar í felagnum.

Umframt broytingar í lønunum og í øðrum gjøldum gjørdu partarnir semju um at kanna, um vaktarskipanin hjá sløkkiliðsfólkunum er tíðarhóskandi.

Sløkkiliðsfólk fingu eitt munandi lyft í vaktargjaldinum, og avtala varð gjørd um at kanna viðurskiftini nærri.

### PROTOKOLLAT VIÐV. § 20 UM SLØKKILIÐIÐ

Partarnir eru samdir um at hyggja at vaktarskipanini hjá sløkkiliðsfólkum, harundir innihaldinum í arbeiðinum í vaktini.

Partarnir kanna eisini, um samsýningin til sløkkiliðsfólk sambært § 20, stk. 1 er tíðarhóskandi m.a. við at kanna møguleikan við stigvíst at fara frá verandi skipan til at fylgja vanligu reglunum um vaktargjald sambært § 30 í sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá sáttmálapørtunum verður settur at kanna vaktararbeiðið hjá sløkkiliðs-

fólkunum. Arbeiðið byrjaði í september 2022 og skal vera liðugt á sumri 2023.

Partarnir gjørdu eisini avtalu um at kanna og raðfesta onnur viðurskifti í sáttmálaskeiðinum, sum gongur fram til 1. oktober 2024, harímillum at kanna møguleikan fyri at endurskoða bygnaðin í lønartalvuni og at varpa ljós á førleikamenning o.a.

### HEILSUHJÁLPARAFELAG FØROYA

Samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið snúðu seg eisini í stóran mun um at lyfta lønina hjá limum felagsins. Við tað at partarnir ikki av sínum eintingum funnu semju um lønina, endaðu samráðingarnar við seming.

Lønarhækkanin til limirnar í Heilsuhjálparafelagnum lógu á støði við hækkingarnar í semjuni við Starvsfelagið:

- Tann 1. januar 2022 hækkaðu lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækkaðu lønirnar við kr. 710
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,5%

Umframt omanfyri nevndu lønarhækkan fingu heima- og heilsuhjálparar nýggj endastig. Soleiðis var dentur lagdur á at hækka endalønirnar hjá limum felagsins.

Í samráðingunum viðgjørdu partarnir í fleiri umførum setanarviðurskiftini hjá starvsfólkunum á økinum. Heilsuhjálparafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið samdust um at halda fast í gamla protokollatinum um at kanna setanarviðurskiftini hjá limum felagsins og frameftir at varpa ljós á yrkisførið hjá limum felagsins.

### FYSIOTERAPEUTFELAGIÐ OG ERGOTERAPEUTFELAGIÐ

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur gjørt serstaka avtalu við Fysio- og Ergoterapeutfeløgini um at fylgja sáttmála teirra við Fíggjarmálaráðið, umframt at vit hava serstaka avtalu um flokkingar á kommunala sáttmálaøkinum. Soleiðis hevur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fylgt hesum sáttmálum – og verið við í samráðingunum eftir tørvi.

Lønarhækkanin í tíðarskeiðinum varð tann sama sum fyri onnur fakfeløg, men samansetingin ein onnur, við tað at felagið valdi at lækka eftirlønargjaldið úr 15,8% niður í 15%. Tillagingar vórðu gjørdar í lønartalvuni, sum samsvaraðu við lønarhækkanina í tíðarskeiðinum.

Leiðaralønirnar í sáttmálanum, eisini leiðaralønirnar á eldraøkinum, vórðu greitt avtalaðar í semjuni.

Semja varð undirskrivað við Fysio- og Ergoterapeutfelagið tann 28. januar 2022.

### HEILSURØKTARAFELAGIÐ

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið byrjaðu samráðingarnar við Heilsurøktarafelagið í oktober 2022. Síðani varð val útskrivað, og samráðingarnar støðgaðu.

Samráðingarnar eru ikki tiknar upp aftur, síðani nýtt landsstýri hevur tók við, orsakað av at viðurskiftini viðvíkjandi framhaldandi samráðingunum enn eru ógreið.

Hendingar í árinum

## Fastan bústað í kampingvogni

Ein borgari hevði spurt seg fyri hjá kommununi, um hann kundi seta ein kampingvogn á alment ella privat øki og brúka vognin sum fastan bústað. Kommunan ivaðist í, um hetta var lógligt.

Skrivstovan upplýsti, at vit ikki hava nakra serstaka føroyska regulering um kampingvognar. Danir hava ávísa regulering, men donsku reglurnar tykjast umstríddar og verða tulkaðar ymiskt í ymsum kommunum.

Kunnað varð um, at lógin um fólkayvirlit er ikki nøkur forðing fyri at hava skrásettan fastan bústað í einum kampingvogni. Men hetta gevur ikki nøkur rættindi mótvegis ánarum, kommununi ella øðrum – annað enn, at borgarin kann skráseta seg sum búsitandi har.

Vil mann seta ein kampingvogn fast á alment øki ella privata ogn hjá øðrum, so krevur tað sjálvandi loyvi frá ella leiguavtalu við ánaran – uttan mun til, um økið er privat ella alment. Skrivstovan metir eisini, at ein slík varandi plasering av kampingvogni á einari grund, er fevnd av byggilógini – um ætlanin væl at merkja er at búgva fast í vogninum. Heimild er sostatt hjá kommununi at seta krøv eftir byggilógini. Og harvið kann viðgerðin av málinum eisini føra til, at kommunan ikki kann geva neyðuga loyvið.

## SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR Í 2022-23

Fleiri av sáttmálunum hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum fóru úr gildi tann 1. oktober í 2022.

Sáttmálasamráðingarnar fóru kortini ikki í gongd orsakað av politisku støðuni; bíðað varð eftir, at nýtt landsstýri tók við.

Nýggja landsstýrið tók við um ársskiftið, og nýtt samgonguskjal varð lagt fyri dagin. Eitt samgonguskjal, sum í fleiri mátar legði seg út í kommunal viðurskifti. Samgongan hevur stungið út í kortið ætlanir um eitt lønarlyft til starvsfólk, sum í stóran mun virka á kommunala sáttmálaøkinum á dagstovna- og eldraøkinum.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið hava havt fundir um komandi samráðingarnar um ætlaða lønarlyftið og kompensatiónina av ætlaða lønarlyftinum.

Semja er nú um at byrja samráðingarnar aftur í næstum og at bíða við lønarlyftinum, altso at halda lønarlyftið uttanfyri vanligu samráðingarnar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið skal samráðast við hesi fakfeløg í vár og í heyst: Danska Tannlæknafelagið, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Heilsurøktarafelagið, Maskinmeistarafelagið, Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna og Føroya Pedagogfelag.

Fíggjarmálaráðið hevur í sama tíðarskeiði fleiri samráðingar um sáttmálar, sum verða brúktir á kommunala sáttmálaøkinum, harímillum sáttmálin við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið luttekur í hesum samráðingum eftir tørvi.

## PROTOKOLLAT UM AT KANNA FYRIREIKING Á DAGSTOVNUNUM ENDALIGA GJØGNUMFØRT

Loksins eru partarnir komnir á mál við kanningini av fyrireikingartíðini á dagstovnaøkinum.

Pedagogfelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið skipaðu fyri framløgu av tilmælinum, sum partarnir hava arbeitt við seinasta árið.

Ein fylgibólkur hjá pørtunum legði fram tilmælið á felags evnisdegi tann 22. mars 2023. Allir leiðarar og starvsfólk á dagstovnunum í øllum Føroyum, sum eru limir í Føroya Pedagogfelag, eru spurd. Av hesum høvdu 48 dagstovnaleiðarar svarað, sum er eitt svarprosent á 75%. Av teimum spurdu 322 starvsfólkunum var svarprosentið 32%.

Ein av niðurstøðunum er, at leiðarar á dagstovnum brúka í miðal 9 tímar til fyrireiking og 4 tímar í miðal til eftirmeting um vikuna. Námsfrøðingar brúka 3 tímar og hjálparfólkini 1,8 tímar í miðal til fyrireiking um vikuna. Harumframt brúka námsfrøðingar 1 tíma og hjálparfólkini 0,6 tímar í miðal um vikuna til eftirmeting. Sostatt gevur kanningin eina ábending um, at bæði leiðarar og starvsfólk hava tíð til fyrireiking og eftirmeting á dagstovnaøkinum – og meira enn 1 tíma um vikuna, sum § 10 í sáttmálanum ásetur, at námsfrøðingar á dagstovnum kunnu brúka til fyrireiking. Eftirsum kanningin vísir á miðaltøl, eru sjálvandi leiðarar og starvsfólk, sum brúka bæði meiri og minni tíð enn hesi miðaltøl.

Fylgibólkurin mælir til, at tað er dagstovnaleiðarin, sum eigur at skipa fyrireikingina og eftirmetingina, og at hetta arbeiðið verður gjørt, tá umstøðurnar loyva tíð. Tá stovnurin til dømis er raktur av sjúku millum starvsfólk, má arbeiðið við fyrireiking og eftirmeting víkja, og barnatíðin raðfestast. Hinvegin tá ið øll starvsfólk eru tøk, og barnatalið er lágt, er møguligt, at leiðarin ásetir meira tíð til fyrireiking og eftirmeting. Tilmælið er at finna á www.kaf.fo

## KANNING AV SETANARVIÐURSKIFTUNUM HJÁ HEIMA- OG HEILSUHJÁLPARUM

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fyrireikar seg til kanning, sum felagið skal gera saman við Heilsuhjálparafelagnum um setanarviðurskiftini hjá heima-/heilsuhjálparum. Felagið hevur verið í samskifti við leiðarar og umsitingarlig starvsfólk, sum vara av eldraøkinum fyri at fáa nærri innlit í, hvussu starvsfólk á økinum, serliga heima- og heilsuhjálparar, eru sett og og lønt.

Kanningararbeiðið, sum skal gerast saman við Heilsuhjálparafelagnum, er avtalað í undanfarnum samráðingum. Tá kanningarúrslit fyriliggja, skal skipast fyri felags evnisdegi, har ljós skal varpast á setanarviðurskiftini og yrkisførið á økinum.

## ENDURSKOÐAN AV VAKTARSKIPANINI Á SLØKKILIÐSSTØÐINI Í TÓRSHAVN

Arbeiðið við at endurskoða vaktarskipanina á Sløkkiliðsstøðini er í gongd. Tórshavnar kommuna hevur skipað fyri vitjan á Sløkkiliðsstøðini, har leiðslan á staðnum greiddi Starvsfelagnum og Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum frá yvirskipaðum uppgávum - og dagliga arbeiðinum hjá sløkkiliðsfólkunum. Arbeitt verður víðari við at endurskoða vaktarskipanina hjá sløkkiliðsfólkum.

## SAMRÁÐINGAR – MEN EISINI RÁÐGEVING OG VEGLEIÐING

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er ein virkin partur á kommunala sáttmálaøkinum. Vit hava samráðingar og annað samskifti við fakfeløgini og aðrar myndugleikar, umboðandi kommunurnar.

Ráðgeving og vegleiðing til starvsfólkini í kommunalu umsitingunum eru millum okkara fremstu og týdningarmestu uppgávur. Vit fegnast um, at kommunur og interkommunalir arbeiðsgevarar gera brúk av okkara ráðgeving og vegleiðing og heilsa framhaldandi fyrispurningum vælkomnum.


Starvsfólk í SSP-samstarvinum

## SSP-ráðgevingin

SSP-ráðgevingin virkar fyri at samskipa SSP-arbeiðið kring landið og veita ráðgeving til økisbólkarnar í SSP-samstarvinum. Økisbólkarnir eru skipaðir í teimum átta barnaverndarøkjunum við umboðum frá barnaverndartænastum, skúlum, politii, frítíðarskúlum, ungdómshúsum v.m., ið møtast regluliga við einum felags endamáli: at tryggja trivnað millum børn og ung við at raðfesta fyribyrgjandi arbeiðið, og harvið minka um vandafaktorar.

Eins og øll hini árini, síðani SSP-samstarvið varð stovnað í 2008, hevur stórur eftirspurningur verið eftir fyribyrging, bæði kommunalt og politiskt. Seinastu árini hevur SSP lagt stóra áherðslu á týdningin av góðum og tøttum foreldrasamstarvi, umframt undirvísing og vegleiðing í at nýta rættan atburð á netinum við talgildum fólkaskikki.

Í mars 2022 fekk løgmaður handað “Heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028”, og her var tilmælið frá arbeiðsbólkinum greitt: “Fyribyrging og lívsmeistran eru bestu amboðini at tálma rúsevnismisnýtslu.” Samstundis bleiv ynski sett fram um at gera SSP-samstarvið sjónligari í samfelagnum og seta sjóneykuna á rúsevnisfyribyrging í arbeiðinum hjá SSP. Hetta hevur SSP-ráðgevingin serliga tikið til eftirtektar og stig til. SSP-ráðgevingin hevur síðani heildarætlanina víðkað virksemið við at fáa nýggjan ráðgeva í brotsfrøði við royndum at fyribyrgja rúsdrekka- og rúsevnisnýtslu millum ung. Metstór luttøka var eisini á árligu SSP-ráðstevnuni, har dentur var á familjusambond og íslendska myndlinum innan SSP-arbeiði. Nógv orka er løgd í at styrkja SSP-samstarvið enn meira fyri at vitanardeila og skipa fyri fleiri einsháttaðum, mennandi og uppbyggjandi átøkum fyri børn og ung í Føroyum. Sum dømi kann nevnast átakið, “Sára og Aleks”, ið barnaverndartænasturnar fara at veita øllum 4.-6. flokkum komandi skúlaár. Endamálið er at kunna børnini um, hvat ein sosialur myndugleiki er, hvat fráboðanarskylda og vansorgan eru, umframt hvørjar støður kunnu taka seg upp, har barnaverndartænastan kann veita hjálp. Hesi nýggju átøk verða somuleiðis við til at gera SSP-samstarvið enn sjónligari.

## Verkætlanin, Talgilda HeilsuSkipanin

Kommunufelagið samskipar vegna eldraøkini eisini Cosmic-verkætlanina, sum er staðsett við einum verkætlanarleiðara í Kommunuhúsinum.

Cosmic er sjúklingajournalskipan fyri allar borgarar í Føroyum. Eldraøkini varða av nøkrum av teimum mest kompleksu og veikastu sjúklingunum, og tí eru stórir fyrimunir fyri bæði borgarar og starvsfólkið innan eldraøkið, at økið gerst partur av Talgildu HeilsuSkipanini, THS.

THS fevnir um sjúklingajournalskipan fyri allar borgarar í Føroyum. Kommunalu heilsutænasturnar fevna um allar veitingar í bú- og heimatænastunum, og sera nógv meirvirði er skapt fyri borgaran og samfelagið sum heild, tá Sjúkrahúsverkið, kommunulæknar, Apoteksverkið og kommunalu heilsutænasturnar arbeiða í somu skipan.

Kommunalu heilsutænasturnar varða millum annað av borgarum við kompleksum sjúkum. Fleiri av hesum borgarunum fáa ikki sjálv greitt frá síni sjúkrasøgu ella endurgivið frá eini læknavitjan.

Heimasjúkrarøktin møtir nýggjum sjúklingum hvønn dag, og hesi kunnu vera í øllum aldri.

Við THS fáa avvarðandi partar innan heilsuøkið eina felags skrásetingarskipan við felags minni, og hetta er

góður stuðul til at kunna veita borgarunum góða og trygga tænastu. Samstundis fáa starvsfólkini smidligari arbeiðsumstøður.

Í februar 2022 varð journalskipanin dagførd, og kommunalu heilsutænasturnar fáa stóra gleði av funkum í nýggju dagføringini, eins og royndirnar, sum Sjúkrahúsverkið hevur við skráseting í journalskipan, gagna víðari framburðinum í verkætlanini væl.

Málið fyri 2022 var at fáa pilotdeildirnar í rakstur. Heilsu- og umsorganartænastan í Tórshavn, Norðoya Bú- og Heimatænasta og Roðin eru í stýrisbólkinum fyri verkætlanina. Hesi trý øki veita eisini starvsfólk til verkætlanina til samskipan, kravfesting, uppseting og test. Pilotdeildirnar eru tey fyrstu, sum skjalfesta í skipanini og gera tillagingar saman við Sjúkrahúsverkinum.

Verkstovur vórðu hildnar frá mars til juni viðvíkjandi uppseting og test. Í september byrjaði verkseting, og Sambýlið á Heygnum í Norðoya Bú- og Heimatænastu var fyrst á skipanina tann 19. september. Eina viku seinni kom pilotdeild hjá Roðanum á skipanina, og í november kom pilotdeild hjá Heilsu- og umsorganartænastuni í Tórshavn á skipanina.

Í desember til februar 2023 varð arbeitt við tillagingum til uppsetingina.

Landslæknin hevur framt eftirlit á fleiri bústovnum í vetur, og vitjaði millum annað pilotdeildina hjá Roðanum. Ummælið av hesum var, at uppsetingini er púra í tráð við vegleiðing frá Sundhedsstyrelsen, at journalskipanin stuðlar væl undir tær arbeiðsgongdir, sum eru á einum bústovni, og gevur greiða mynd av støðuni hjá borgaranum. Hetta er dygdarmennarum, sjúkrarøktarfrøðingum, terapeutum í pilotbólkunum og starvsfólkunum í THS/Sjúkrahúsverkinum fyri at takka. Hesi hava gjørt eitt áhaldandi megnararbeiði.

Fram móti sumri 2023 verður arbeitt við at verkseta bústovnar hjá Heilsu- og umsorganartænastuni hjá Tórshavnar kommunu, Norðoya Bú- og Heimatænastu og Roðanum. Nógv arbeiði er eftir, fyri at verkætlan kemur á mál, tí framvegis er eftir at gera uppseting fyri heimatænastuna, og arbeitt verður áhaldandi við samskifti millum Sjúkrahúsverkið, kommunulæknar, Apoteksverkið og kommunalu heilsutænasturnar.

Hendingar í árinum

## Stuðul til kristiligar felagsskapir

Viðkomandi nevnd í einari kommunu var farin undir at endurskoða stuðulspolitikkin hjá kommununi. Í hesum sambandi hevði spurningurin tikið seg upp, um kommunan kundi stuðla kristiligum felagsskapum. Kommunan ætlaði at gera eina heildarvegleiðing um, hvat kommunan kann stuðla.

Skrivstovan vísti á, at hetta økið er trupult at siga nakað beinrakið um í stuttum. Yvirskipaða kravið til virksemið hjá kommununi er tó (tá ið tað ikki er lógarbundið), at tað skal vera til frama fyri ein viðkomandi tørv hjá borgaranum, og vera grundað í tørvinum hjá kommunala felagsskapinum. Eisini er í útgangsstøðinum krav um at halda virksemið lokalt, ikki virka til frama fyri einstaklingar og ikki fara inn á myndugleikaøkið hjá øðrum.

Sum tummilsregla kann kommunan spyrja, um kommunan sjálv kundi skipað fyri tí, sum stuðul verður veittur til, ella sum peningurin fer at vera brúktur til. Er svarið ja, so er mann oftast á heilt góðari leið.

Givið er tað, at tað er ikki ein kommunal uppgáva at virka sum kristiligur felagsskapur. Og tað ger kommunan nokk í stóran mun, um reinur rakstrarstuðul verður latin slíkum felagsskapi.

Hinvegin er eins givið, at kommunan kann stuðla til dømis mentanarligum átøkum/tiltøkum í sínum øki, og hetta er sjálvandi ikki tongt at, hvør skipar fyri – men harafturímóti innihaldinum.

Hendingar í árinum

## Ósemja millum grannar var ikki mál fyri kommununa

Tveir grannar vóru ósamdir um ymisk viðurskifti um markið millum ognir teirra. Serliga snúði tað seg um, hvør átti garðin millum ognirnar og um eitt grannaloyvi, sum ein fyrrverandi eigari hevði givið til annan grannan. Grannarnir spurdu seg fyri hjá kommununi, hvussu viðurskiftini skuldu vera teirra millum.

Skrivstovan metti, at her var talan um reint privatar ósemjur. Leikluturin hjá kommununi í hesum sambandi er at vera grannunum til hjálpar við teimum upplýsingum, sum kommunan kann hugsast at hava um málið. Kommunan hevur ongan annan leiklut í málinum, tí tað er ikki uppgávan hjá kommununi at loysa ósemjur av slíkum slagi.

# 8. At enda

Kommunurnar í Føroyum eru vorðnar ein alsamt størri og meira týðandi partur av føroyska vælferðarsamfelagnum. Vælferðarsamfelagið, sum øllum kunnugt í framtíðini kemur undir trýst orsakað av teimum stóru demografisku broytingunum, sum liggja fyri framman.

Tað er tí meira umráðandi enn nakrantíð, at land og kommunur finna felags stev í fyrireikingunum til tær bygnaðarbroytingarnar, sum øll fakligt tilmæli siga tørv vera á, og sum tykjast neyðug fyri at framtíðar ættarlið eisini skulu kunna liva í einum framkomnum og vælvirkandi vælferðarsamfelagi.

Endamálið hjá okkum øllum, bæði landspolitikarum og kommunupolitikarum, má vera at fáa eitt samfelag, ið mennist í javnvág, har liviligt er í øllum landinum, og har tann einstaki hevur rætt til grundleggjandi vælferðartænastur, uttan mun til hvar í landinum hann búleikast.

Sama um vit sita í løgtinginum ella í kommununum, so eru vit fólksins tænarar, og hóast vit sum kommunustýrislimir eru valdir lokalt, so eiga vit altíð at hugsa um heildina eisini og um framtíðina hjá hesum samfelagi.

Tí skulu vit finna loysnirnar í felag, land og kommunur. Ikki stuttskygdar, men loysnir sum ganga longri fram enn fýra ár.

Tað er somuleiðis umráðandi, at vit kommunustýrislimir, eins og løgting og landsstýri, altíð seta borgaran í miðdepilin. Fyri tann einstaka hevur tað týdning at fáa eina tænastu frá tí almenna, tá ið tørvur er á slíkari. Tað hevur minni týdning, um tað er kommuna, ella um tað er ein landsmyndugleiki, sum veitir neyðugu tænastuna.

Vit vóna, at góða samskiftið sum higartil hevur verið við nýggja landsstýrið, heldur áfram.

Áhugamálini hjá kommununum verða best tryggjað í einum sterkum kommunufelagsskapi. Vit mugu ásanna, at tørvurin á einum sterkum felagsskapi er størri nú enn nakrantíð áður.

Tí hevur ongantíð verið so neyðugt sum í dag, at vit standa saman, halda fast við áræðið og við at vilja finna felags loysnir.

Takk fyri og framhaldandi góðan aðalfund!

# 9. Kommunubúskapurin í 2022

## Gongdin í fólkatalinum í 2022

Vøksturin í fólkatalinum, sum byrjaði í 2013, helt fram í 2022, og við ársenda 2022 búðu 54.200 fólk í Føroyum. Hetta er 635 fleiri enn við ársbyrjan, og ein vøkstur á 1,2%.

Vøksturin seinnu árini hevur verið rættiliga ójavnt býttur millum kommunurnar, og soleiðis var eisini í 2022. Eins og undanfarin ár er mesti vøksturin í miðstaðarøkinum. Størsti vøksturin er í kommununum rundan um Skálafjørðin – ivaleyst eitt úrslit av Eysturoyartunlinum.

Talva 2

**Fólkatalið í kommununum við ársbyrjan og ársenda í 2022**

| Kommuna | 1. januar 2022 | 1. januar 2023 | Vøkstur | Vøkstur % |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | 22.704 | 23.036 | 332 | 1,5% |
| Klaksvíkar kommuna | 5.382 | 5.421 | 39 | 0,7% |
| Runavíkar kommuna | 4.270 | 4.342 | 72 | 1,7% |
| Eystur kommuna | 2.240 | 2.263 | 23 | 1,0% |
| Vága kommuna | 2.165 | 2.185 | 20 | 0,9% |
| Sunda kommuna | 1.818 | 1.832 | 14 | 0,8% |
| Tvøroyrar kommuna | 1.769 | 1.771 | 2 | 0,1% |
| Fuglafjarðar kommuna | 1.612 | 1.627 | 15 | 0,9% |
| Nes kommuna | 1.450 | 1.500 | 50 | 3,4% |
| Vágs kommuna | 1.376 | 1.363 | -13 | -0,9% |
| Vestmanna kommuna | 1.257 | 1.267 | 10 | 0,8% |
| Sørvágs kommuna | 1.249 | 1.246 | -3 | -0,2% |
| Sjóvar kommuna | 1.134 | 1.188 | 54 | 4,8% |
| Eiðis kommuna | 788 | 804 | 16 | 2,0% |
| Hvalbiar kommuna | 678 | 666 | -12 | -1,8% |
| Kvívíkar kommuna | 598 | 604 | 6 | 1,0% |
| Sands kommuna | 525 | 524 | -1 | -0,2% |
| Skopunar kommuna | 449 | 472 | 23 | 5,1% |
| Hvannasunds kommuna | 416 | 428 | 12 | 2,9% |
| Viðareiðis kommuna | 353 | 348 | -5 | -1,4% |
| Sumbiar kommuna | 357 | 343 | -14 | -3,9% |
| Porkeris kommuna | 317 | 332 | 15 | 4,7% |
| Kunoyar kommuna | 147 | 150 | 3 | 2,0% |
| Skálavíkar kommuna | 138 | 125 | -13 | -9,4% |
| Hovs kommuna | 101 | 104 | 3 | 3,0% |
| Húsavíkar kommuna | 109 | 103 | -6 | -5,5% |
| Fámjins kommuna | 84 | 79 | -5 | -6,0% |
| Fugloyar kommuna | 38 | 43 | 5 | 13,2% |
| Skúvoyar kommuna | 41 | 34 | -7 | -17,1% |
| **Alt landið** | **53.565** | **54.200** | **635** | **1,2%** |

# Kommunubúskapurin

Roknskapirnir hjá kommununum fyri 2022 eru ikki endaliga uppgjørdir enn, men mett verður, at rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum vóru samanlagt 2.319 mió. kr. í 2022. Inntøkurnar vóru 3.020 mió. kr., og tað hevur við sær, at rakstrarúrslitið fyri allar kommunur samanlagt var umleið 701 mió. kr. í 2022.

Íløgurnar verða mettar til 752 mió. kr. í 2022, og tað ber við sær, at samlaða úrslitið fyri allar kommunur samanlagt verður eitt hall á umleið 51 mió. kr. í 2022. Hetta er fimta árið á rað, at hall er samanlagt í kommunala geiranum. Í 2020 var hallið 273 mió. kr., og í 2021 var tað 73 mió. kr.

Tað eru tær søguliga stóru íløgurnar, ið eru orsøk til, at hall hevur verið seinastu fýra árini. Verður einans hugt at sjálvum rakstrinum, so er talan um eitt hampiligt rakstraravlop, sum er eitt sindur størri enn árligu íløgurnar vanliga eru. Roknað verður við einum meira vanligum støði á íløgunum komandi árini, og so verður væntandi aftur avlop í kommunala geiranum.

## INNTØKUR

Samlaðu inntøkurnar hjá kommununum vóru umleið 2.812 mió. kr. í 2021.

Størsti parturin av inntøkunum hjá kommununum stava frá kommunuskatti. Í 2022 var talan um 2.245 mió. kr., og tað er umleið 3/4 av samlaðu inntøkunum.

Inntøkurnar frá skatti av inngjøldum til eftirløn hava, síðan eldraøkið var lagt út í 2015, verið ein munandi og vaksandi partur av kommunalu inntøkunum. Í fjør gjørdist talan um 475 mió. kr. Restin av inntøkunum stavar frá felagsskattinum, sum var 196 mió. kr. og afturbering fyri serskipanir, sum var 104 mió. kr.

Inntøkurnar vuksu við 210 mió. kr. samanlagt í 2022, og tað samsvarar við 7,5%. Tað má sigast at vera ein sera góður vøkstur. Serliga um hugt verður í mun til 2021, har inntøkurnar vuksu einans 18 mió. kr. samanlagt, ella 0,6%. Kommunuskatturin vaks heili 5,8% í 2022. Hetta er sera góður vøkstur, men tó ikki óvæntað, havandi í huga at vøkstur er bæði í sáttmálalønunum og í løntakaratalinum.

Felagsskatturin gjørdist heilar 52 mió. kr. størri í 2022 enn í 2021. Tann felagsskatturin, sum kommunurnar fingu í 2021, var fyri roknskaparárið 2020, sum var árið, korona rakti landið. So tað var væntandi, at inntøkurnar frá felagsskatti fóru at lækka í 2021, og at tær síðan fóru at vaksa aftur í 2022.

## KOMMUNUSKATTUR

Kommunuskattur verður rindaður av skattskyldugu inntøkuni omanfyri botnfrádráttin á 30 tús. kr. Botnfrádrátturin, ið er ásettur í skattalógini, hevur hevur verið óbroyttur síðan 2008. Frá útroknaða skattinum verður drigin ein barnafrádráttur, ið kommunustýrið sjálvt ásetur.

Kommunuskattaprosentini hava sum heild verið lækkandi seinastu árini, og barnafrádrátturin hevur sum heild verið hækkandi.

Grundarlagið undir kommunuskattinum er rættiliga ymiskt kring landið. Tað, sum serliga kann minka um grundarlagið undir kommunuskattinum er, um nógvir pensjónistar búgva í kommununi, tí fólka- og fyritíðarpensjón eru næstan skattafríar. Men eisini hevur tað stóra ávirkan, um nógv arbeiða uttanlands ella eru undir serskipanum sum FAS og DIS.

Minsta kommunuskattin pr. íbúgva í 2022 fekk Hovs kommuna við 29.000 kr. pr. íbúgva. Hinvegin fekk Fuglafjarðar kommuna helvtina meira, 45.500 kr. pr. íbúgva. Í miðal fáa kommunurnar umleið 41.500 kr. í kommunuskatti fyri hvønn íbúgva.

## FELAGSSKATTUR

Sambært § 5 í ásetingarlógini fellur 70% av felagsskattinum til landið og 30% til kommunurnar. Skatturin fellur ymiskt, alt eftir hvar í landinum feløg eru heimahoyrandi. Tó rinda peningastovnar, tryggingarfyritøkur, telesamskiftisfyritøkur, oljusølufyritøkur og vinnurekandi grunnar skatt til allar kommunur.

Tað er sera ymiskt, hvussu felagsskatturin hilnast hjá kommununum. Seinastu árini hava serliga tær kommunur, har alivirksemi er, og har uppsjóvarfeløg eru heimahoyrandi, fingið væl av inntøku. Nógv mestu inntøku pr. íbúgva í 2022 fekk Fuglafjørður, har inntøkan var omanfyri 13.000 kr. pr. íbúgva. Hinvegin eru fleiri kommunur, ið fáa minni enn 1000 kr. pr. íbúgva. Miðal fyri alt landið var 3.600 kr. fyri hvønn íbúgva í 2022.

Talva 3

## Úrslit samanlagt fyri allar kommunur

| | 2020 | 2021 | Meting 2022 |
|---|---|---|---|
| Rakstur | 2.136 | 2.238 | 2.319 |
| Inntøkur | 2.794 | 2.811 | 3.020 |
| **Rakstrarúrslit** | **658** | **572** | **701** |
| Íløgur | 931 | 646 | 752 |
| **Samlað úrslit** | **-273** | **-73** | **-51** |

Talva 4

## Inntøkurnar hjá kommununum í 2022

| | Meting 2022 í mió. kr. | Vøkstur 2022 í mió. kr. | Vøkstur 2022 í % |
|---|---|---|---|
| Kommunuskattur | 2.245 | 122 | 5,8% |
| Felagsskattur | 196 | 52 | 36,1% |
| Eftirlønarskattur | 475 | 38 | 8,6% |
| Afturbering | 104 | -2 | -1,9% |
| **Tilsamans** | **3.020** | **210** | **7,5%** |

Talva 5

## Samlaðar rakstrarútreiðslur hjá kommunum

| | Meting 2022 í mió. kr. | Vøkstur 2022 í mió. kr. | Vøkstur 2022 í % |
|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 243 | 5,0 | 2,1% |
| Almanna- og heilsumál | 771 | 30,6 | 4,1% |
| Børn og ung | 529 | 48,2 | 10,0% |
| Undirvísing | 161 | 2,5 | 1,6% |
| Mentan og frítíð | 158 | -3,3 | -2,0% |
| Teknisk mál | 295 | -0,9 | -0,3% |
| Kommunal virki | 101 | -15,2 | -13,1% |
| Íbúðarmál | 39 | 3,3 | 9,4% |
| Rentur | 23 | 10,7 | 86,1% |
| **Tilsamans** | **2.319** | **81,0** | **3,6%** |

Talva 6

**Samlaðar íløgur hjá kommunum seinastu 3 árini**

| Mió. kr. | 2020 | 2021 | Meting 2022 |
|---|---|---|---|
| Kommunal fyrisiting | 8 | 2 | 1 |
| Almanna- og heilsumál | 85 | 59 | 12 |
| Børn og ung | 50 | 40 | 47 |
| Undirvísing | 262 | 35 | 44 |
| Mentan og frítíð | 82 | 129 | 132 |
| Teknisk mál | 253 | 274 | 349 |
| Kommunal virki | 191 | 105 | 169 |
| **Tilsamans** | **931** | **646** | **752** |

Hendingar í árinum

# Kommunustýrislimur kundi ikki vera við í viðgerð

Umsitingin í einari kommunu vendi sær til skrivstovuna um privata vinnuvirksemið hjá kommunustýrislimi.

Kommunustýrislimurin hevði fyritøku, sum kundi bjóða seg fram at gera uppgávur fyri kommununa. Sum kommunustýrislimur kundi hann fáa kunnleika til kostnaðarmetingar, váðametingar og annað, sum onnur vinnurekandi ikki høvdu atgongd til.

Skrivstovan upplýsti, at ein kommunustýrislimur sjálvandi kann bjóða seg fram sum privatur vinnurekandi at loysa uppgávur fyri kommununa. Men hann eigur ikki at vera við í kommunalu viðgerðini av eitt nú ítøkiligum uppgávum, sum kommunan ætlar at veita út – og sum liggja innan fyri hansara vinnuligu áhugamál.

Serliga tvær orsakir eru til hetta: Onnur er, at kommunustýrislimurin gerst ógegnigur, um hann hevur serligt (persónligt ella vinnuligt) áhugamál í einum máli. Hin er, at kommunustýrislimurin ikki skal hava framíhjárætt til upplýsingar ella annan serligan fyrimun framum onnur vinnurekandi.

Tað er altíð ein ítøkilig meting, um kommunustýrislimurin kann vera partur av málsviðgerðini. Í hesum sambandi er ikki nóg mikið, at hann bert hevur onkran hypotetiskan áhuga í einum máli. Og kommunustýrislimurin kann vanliga eisini vera við til at gera meira yvirskipaðar kommunalar raðfestingar – eisini hóast partar av hesum eru innanfyri vinnuligu áhugamál hansara.

### SKATTUR AV EFTIRLØNARINNGJØLDUM

Sambært §12, stk. 1 í eftirlønarlógini fellur skatturin av inngjøldum til pensjón til kommununnar eftir talinum av persónum 67 ár ella eldri. Tó so, at talið av borgarum 67 ár ella eldri í Sandoy verður hækkað við 30%.

Skatturin fellur serliga til tær kommunur, har nógv eldri búgva, og tað eru yvirhøvur kommunur í Suðuroy og Sandoy. Mest pr. íbúgva í 2022 fingu Húsavíkar og Skúvoyar kommunur við meira enn 25.000 kr. fyri hvønn íbúgva. Minst fekk Sjóvar kommuna við 7.400 kr. fyri hvønn íbúgva. Miðal fyri landið var umleið 8.800 kr. fyri hvønn íbúgva í 2022.

### AFTURBERING VEGNA DIS, FAS OG FRÁDRÁTTIR

Í sambandi við at kommunurnar yvirtóku eldraøkið 1. januar 2015 var ásett í løgtingslóg nr. 136 frá 19. desember 2014 um endurgjald til kommunur vegna frádráttir og serskattaskipanir, at kommunurnar árliga fáa eina upphædd, ið samsvarar við 19,1% av:

- DIS-inntøku
- FAS-inntøku
- Fiskimannafrádráttinum (§ 25a)
- Uttanlandsfrádráttinum (§ 25b)

Endurgjaldið verður latið kommunum eftir bústaði hjá viðkomandi skattgjaldara.

Nógv mest í 2022 fingu Skálavíkar og Kunoyar kommunur við omanfyri 4.300 kr. fyri hvønn íbúgva. Minst fingu Skúvoyar og Fámjins kommunur umleið 800 kr. fyri hvønn íbúgva. Í 2022 var talan um í miðal 1.900 kr. fyri hvønn íbúgva fyri alt landið.

### RAKSTRARÚTREIÐSLUR

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá kommununum verða mettar til 2.319 mió. kr. í 2022. Í 2021 vóru samlaðu rakstrarútreiðslurnar 2.238 mió. kr. Vøksturin var 81 mió. kr., ið samsvarar við 3,6%. Hetta má sigast at vera ein hóskandi vøkstur, havandi í huga, at fólkatalið vaks við 1,5%, og at eisini ein munandi vøkstur var í almennu sáttmálalønunum í 2021.

Størsta íkastið til vøksturin í 2022 kom frá økinum, børn og ung, og orsøkin er stóri útreiðsluvøksturin á dagstovnaøkinum.

### ÍLØGUR

Kommunalu íløgurnar hava verið søguliga stórar seinastu árini. Íløgurnar í 2021 vóru munandi minni enn undanfarin ár, men í 2022 vuksu íløgurnar aftur. Roknað verður við samanlagt 752 mió. kr. í 2022.

Stóru íløguøkini í 2022 vóru innan teknisk mál og mentan og frítíð. Innan teknisk mál er tað serliga byggibúning, vegir og havnir, sum fylla nógv. Innan mentan og frítíð er tað serliga ítróttaanlegg.

Hendingar í árinum

## Borgarstjóraval í úrtíð

Tá ið ein borgarstjóri leggur sessin frá sær, skal ein nýggjur veljast. Hetta var støðan í einari kommunu í farna ári, og í hesum sambandi tóku fleiri løgfrøðilig ivamál seg upp. Millum hesi var spurningurin, um tað var eitt krav eftir kommunustýrislógini, at kommunustýrið skuldi vera fullmannað, tá ið nýggi borgarstjórin varð valdur. Umsitingin vendi sær tí til skrivstovuna um hetta.

Skrivstovan vísti á, at lógin ikki hevur nakra áseting um, hvussu kommunustýrið skal vera mannað, tá ið nýggjur borgarstjóri skal veljast. Tí var og er hetta ein tulkingarspurningur.

Tað eru viðurskifti, sum tala fyri, at val av borgarstjóra skal viðgerast, sum var tað fyrsti fundurin í valskeiðnum, tá ið krav er um fulla manning. Og tað eru viðurskifti, sum tala fyri, at talan er um ein regluligan kommunustýrisfund.

Skrivstovan metti, at mest talaði fyri, at talan er um ein regluligan fund. Hetta varð grundað á, at kravið um fullmannað kommunustýri helst má metast sum eitt undantak, sum er beinleiðis ásett í lógartekstinum, og sum tí bert er galdandi fyri fyrsta fundin. Somuleiðis tekur lógin støðu til onnur viðurskifti viðvíkjandi nývali av borgarstjóra, og í hesum sambandi er onki ásett um, hvussu kommunustýrið skal vera mannað.

Dentur varð tó lagdur á, at hetta er ein tulkingarspurningur, og í evsta føri er tað upp til fyrst kommunustýrið og síðani møguliga eftirfylgjandi kærumyndugleika at taka støðu til, um fundurin var lógligur og viðtøkuførur.



Talva 7

## Kommunuskattaprosent og barnafrádráttur í 2023

| Kommuna | Skattaprosent (%) | Barnafrádráttur (kr.) |
|---|---:|---:|
| Fugloyar kommuna | 16,00 | 10.000 |
| Viðareiðis kommuna | 20,50 | 8.000 |
| Hvannasunds kommuna | 19,75 | 7.000 |
| Klaksvíkar kommuna | 20,75 | 5.500 |
| Kunoyar kommuna | 18,50 | 7.000 |
| Fuglafjarðar kommuna | 21,25 | 7.500 |
| Eystur kommuna | 20,50 | 8.500 |
| Nes kommuna | 20,50 | 5.500 |
| Runavíkar kommuna | 21,50 | 8.000 |
| Sjóvar kommuna | 21,00 | 7.000 |
| Eiðis kommuna | 18,75 | 8.000 |
| Sunda kommuna | 21,50 | 6.500 |
| Kvívíkar kommuna | 21,00 | 5.100 |
| Vestmanna kommuna | 21,25 | 5.000 |
| Vága kommuna | 21,75 | 6.500 |
| Sørvágs kommuna | 21,00 | 6.500 |
| Sands kommuna | 20,75 | 8.500 |
| Skopunar kommuna | 20,85 | 6.000 |
| Skálavíkar kommuna | 21,00 | 9.000 |
| Húsavíkar kommuna | 21,00 | 7.000 |
| Skúvoyar kommuna | 16,00 | 8.000 |
| Hvalbiar kommuna | 20,60 | 6.500 |
| Tvøroyrar kommuna | 20,90 | 7.000 |
| Fámjins kommuna | 16,00 | 7.000 |
| Hovs kommuna | 18,00 | 8.000 |
| Porkeris kommuna | 21,00 | 7.500 |
| Vágs kommuna | 21,30 | 6.000 |
| Sumbiar kommuna | 19,00 | 6.000 |
| Tórshavnar kommuna | 19,00 | 9.000 |
| **Hægsta** | **21,75** | **10.000** |
| **Miðal** | **20,10** | **7.702** |
| **Lægsta** | **16,00** | **5.000** |

Talva 8

**Kommunuskattur í kr. pr. íbúgva í 2022**



Talva 9

## Felagsskattur í kr. pr. íbúgva í 2022



Talva 10

**Eftirlønarskattur í kr. pr. íbúgva í 2022**



Talva 11

**Afturbering í kr. pr. íbúgva í 2022**



Talva 12

## Inntøkur samanlagt í kr. pr. íbúgva í 2022







### FÍGGJARSTØÐAN

Mett verður, at samlaða nettoskuldin hjá kommununum var umleið 890 mió. kr. við ársenda í 2022. Tá nettoskuldin verður gjørd upp, verða tøkur peningur og onnur fíggjarlig áogn drigin frá bruttoskuldini.

Nettoskuldin er av serliga stórum áhuga í kommunalum høpi, tí hon ger av, í hvønn mun kommunan kann upptaka skuld. Í § 43, stk. 2 í kommunustýrislógini er ásett, at:

“Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum”.

Tað vil siga, at er nettoskuldin omanfyri eina álíkning, kann kommunan ikki sjálv ráða yvir sínum skuldarviðurskiftum.

Kommunala skuldin var í nógv ár í minking. Men í sambandi við at hall nú hava verið í fimm ár á rað, er skuldin økt nakað. Í miðal samsvarar nettoskuldin nú við 34% av eini álíkning við skattaprosentið á 23%. Í mun til nýggja skuldarmarkið, ið landsstýrið ætlar at áseta, er talan um 28% av einari álíkning.

Skuldarstøðan hjá kommunum hevur tó sjáldan verið so góð sum nú. Samlaða nettoskuldin samsvarar við einans 3,9% av BTÚ. Fyri 10 árum síðani var talan um 6% av BTÚ, og verður farið aftur til 1998, var talan um heili 16% av BTÚ. Samlaða nettoskuldin er sostatt lág í mun til støddina á búskapinum.

Eisini kann staðfestast, at nú eru ongar kommunur, sum hava heilt stóra skuld. Fyri 20 árum síðani vóru fleiri kommunur, sum skyldaðu fleiri ferðir eina álíkning. Fíggjarstøðan hjá kommununum má tí samanumtikið sigast at verða søguliga góð.

### SKULDARMARKIÐ VERÐUR NÚ DAGFØRT

Kommunala skuldarmarkið er ásett í § 43, stk. 2 í kommunustýrislógini. Núverandi skuldarmark er definerað sum tann upphædd, ið kommunan hevði fingið inn í kommunuskatti, um skattaprosentið var 23%. Tað vil siga, at einans kommunuskattur verður tikin við, meðan hinar inntøkurnar verða ikki roknaðar uppí.

Fer ein kommuna upp um markið í skuld, so missir kommunustýrið sítt fíggjarliga sjálvræði. Kommunan má tá fáa loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum. Eisini fær landsstýrismaðurin heimild at áleggja kommununi at gera broytingar í fíggjarætlanini, um skuldin er omanfyri markið.

Áðrenn kommunurnar í 2015 yvirtóku raksturin av eldraøkinum, var kommunuskatturin – so at siga – einasta veruliga inntøkukeldan, ið kommunurnar áttu. At áseta skuldarmarkið í mun til kommunuskattin, var tí sjálvsagt. Men í sambandi við útleggingina av eldraøkinum broyttist inntøkubygnaðurin hjá kommununum grundleggjandi. Eftirlønarskattur og afturbering eru nú samanlagt næstan

Hendingar í árinum

## Innlit í mál, sum ikki var liðugt viðgjørt

Ein kommuna hevði fingið ein umbøn um innlit í eitt ítøkiligt mál um byggiloyvi. Málið var enn bert viðgjørt í umsitingini og hevði ikki fingið nakra politiska viðgerð av týdningi. Ivamálið hjá kommununi snúði seg tískil um, í hvønn mun innlit skuldi latast í málið.

Skrivstovan vísti á, at innlitslógin í § 4, stk. 1 ásetir, at ein og hvør – við ávísum undantøkum – kann “... gera seg kunnugan við skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í sambandi við virksemi myndugleikans.”

Hetta skal skiljast soleiðis, at borgarin fær rætt til innlit í tí løtu, skjalið er hjá kommununi – um treytirnar fyri innliti annars eru loknar.

Harvið fevnir rætturin til innlit eisini um mál, sum eru undir viðgerð. Kommunan kann av somu orsøk ikki vísa innlitsumbøn aftur vísandi til, at málið ikki enn er á ávísum stigi í málsviðgerðini hjá kommununi.

Víst varð samstundis á, at kommunan kortini eigur at meta um, hvørt ávísir partar av málinum sambært galdandi reglum kunnu og/ella eiga at verða undantikin innliti.

helmingurin av inntøkunum í fleiri kommunum. Og í flestu kommunum sunnanfjørðs – har lutfalsliga nógv eldri fólk búgva, og lutfalsliga nógvir borgarar starvast undir serskipanum – stavar umleið ein triðingur av inntøkunum frá eftirlønarskatti og afturbering.

Í sambandi við at eldraøkið varð eftirmett, heittu fleiri kommunur á Kommunufelagið um at reisa málið um at dagføra kommunala skuldarmarkið, soleiðis at tað hóskar til nýggja inntøkubygnaðin. Eisini vístu fleiri kommunur á, at neyðugt verður við stórum íløgum innan eldraøkið komandi árini, og í hesum sambandi verður lættari hjá øllum kommunum at luttaka í fíggingini, um skuldarmarkið verður dagført í mun til nýggja inntøkubygnaðin.

Landsstýrið má sigast at hava gingið Kommunufelagnum á møti í hesum máli, tí 7. mars í ár varð lógarbroyting løgd fram á løgtingi, sum hevur við sær, inntøkurnar frá afturbering og eftirlønarskatti nú verða roknaðar uppí, tá skuldarmarkið verður ásett. Talvan niðanfyri vísir ávirkanina av broytingini. Sum víst, hækkar samlaða skuldarmarkið fyri allar kommunur við 580 mió. kr., ella 22%, meðan sum sæst í talvuni hækkar skuldarmarkið lutfalsliga mest í kommununum sunnanfjørðs.

Talva 13

**Skuldarmørkini hjá kommununum**

| Kommuna | Núverandi skuldarmark | Nýggja skuldarmarkið | Hækking í mió. kr. | Hækking í % |
|---|---:|---:|---:|---:|
| Fugloyar kommuna | 2,7 | 3,3 | 0,7 | 25% |
| Viðareiðis kommuna | 16,9 | 20,8 | 3,9 | 23% |
| Hvannasunds kommuna | 18,6 | 23,6 | 5,0 | 27% |
| Klaksvíkar kommuna | 263,6 | 323,0 | 59,4 | 23% |
| Kunoyar kommuna | 6,8 | 8,8 | 2,0 | 29% |
| Fuglafjarðar kommuna | 80,2 | 98,7 | 18,4 | 23% |
| Eystur kommuna | 112,9 | 134,2 | 21,2 | 19% |
| Nes kommuna | 64,6 | 78,9 | 14,3 | 22% |
| Runavíkar kommuna | 200,5 | 243,2 | 42,7 | 21% |
| Sjóvar kommuna | 52,1 | 63,2 | 11,2 | 21% |
| Eiðis kommuna | 36,9 | 44,7 | 7,8 | 21% |
| Sunda kommuna | 82,3 | 101,8 | 19,5 | 24% |
| Kvívíkar kommuna | 28,3 | 35,7 | 7,5 | 26% |
| Vestmanna kommuna | 56,6 | 73,2 | 16,7 | 29% |
| Vága kommuna | 94,0 | 118,7 | 24,7 | 26% |
| Sørvágs kommuna | 59,2 | 74,2 | 15,0 | 25% |
| Sands kommuna | 21,7 | 31,0 | 9,3 | 43% |
| Skopunar kommuna | 20,3 | 28,8 | 8,5 | 42% |
| Skálavíkar kommuna | 5,5 | 8,7 | 3,3 | 60% |
| Húsavíkar kommuna | 4,2 | 7,2 | 3,0 | 70% |
| Skúvoyar kommuna | 2,1 | 3,0 | 0,9 | 42% |
| Hvalbiar kommuna | 30,7 | 40,0 | 9,3 | 30% |
| Tvøroyrar kommuna | 78,3 | 102,2 | 23,9 | 31% |
| Fámjins kommuna | 3,9 | 5,6 | 1,7 | 43% |
| Hovs kommuna | 3,8 | 5,3 | 1,4 | 37% |
| Porkeris kommuna | 12,1 | 17,2 | 5,1 | 42% |
| Vágs kommuna | 52,9 | 72,6 | 19,7 | 37% |
| Sumbiar kommuna | 14,2 | 19,1 | 4,9 | 34% |
| Tórshavnar kommuna | 1.148,6 | 1.367,1 | 218,5 | 19% |
| **Tilsamans** | **2.574,6** | **3.153,8** | **579,2** | **22%** |

# 10. Kommuna og kommunuhugtakið

Tann kommunala skipanin, ið vit í dag hava í Føroyum, er í stóran mun ávirkað av danskari og norðurlendskari fyrisitingar- og løggávusiðvenju. Men hugtakið lokalt sjálvræði er elligamalt og byggir á hugsanarhátt úr rómverskum rætti, og snúði seg í høvuðsheitum um, at borgarar í einum býi ella øki høvdu framíhjárættindi sum borgarar í rómverska ríkinum, men vórðu stýrd av egnum lokalum myndugleikum eftir sínum egnu lógum.

Longu seint í miðøldini høvdu kommunur nógvar ymsar uppgávur at røkja og hetta broyttist nakað undir einaveldinum, men við donsku grundlógini frá 1849 bleiv sjálvstøðugi rætturin hjá kommununum til at røkja egnar uppgávur staðfestur. Tó var staturin eftirlitsmyndugleiki.

Fyrsta føroyska kommunulógin kom í 1872, og nú galdandi kommunustýrislógin er frá ár 2000.

Í Føroyum hava vit nú 29 sjálvstøðugar kommunur, sum í fólkatali eru spjaddar frá Fugloyar og Skúvoyar kommunum við færri enn 50 íbúgvum til Tórshavnar kommunu við fleiri enn 22.000 íbúgvum. Hóast hesa spjaðing í støðd, er formliga grundarlagið undir føroysku kommununum stórt sæð eins.

## KOMMUNUR Í STÝRISSKIPANARLIGUM HØPI

Lokalt sjálvræði er ein týðandi hornasteinur í okkara fólkaræði. Í § 82 í donsku grundlógini er ásett, at “Kommunernes ret til under statens tilsyn selvstændigt at styre deres anliggender ordnes ved lov.”

Sambært hesum er greitt, at kommunurnar hava rætt til sjálvstøðugt at stýra egnum viðurskiftum. Kommunurnar hava sjálvstøðugt fíggjarligt frælsi og politiskt sjálvræði. Kommunurnar eru sostatt sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir. Harumframt er breið semja um, at málsførleikin hjá kommununum ikki kann avmarkast á ein tílíkan hátt, at tað ikki longur er talan um veruligt sjálvræði. Umframt rættin til sjálv at útskriva og krevja upp skatt, er kommunalt sjálvræði tongt at teimum uppgávum, ið kommunurnar skulu loysa og tí politiska rásarúmi, sum kommunurnar hava til at leggja til rættis, hvussu kommunalar uppgávur skulu loysast.

§ 82 í grundlógini merkir eisini, at viðurskiftini millum landsmyndugleikarnar og kommunurnar ikki eru yvir- og undirskipað, eins og landsfyrisitingin ikki hevur heimildir at geva kommununum boð, á sama hátt sum annars er galdandi í viðurskiftunum millum landsfyrisitingina og stovnar undir landinum. Bindandi reglur fyri kommunur skulu vera ásettar við heimild í lóg ella aðrari rættarkeldu.

Umframt í grundlógini, er lokalt sjálvræði við tilverurættinum hjá kommununum staðfestur í § 56 í stýrisskipanarlógini, ið er soljóðandi: “Rættur kommunanna at skipa egin viðurskifti undir eftirliti landsstýrisins verður ásettur í løgtingslóg, m.a. í hvønn mun kommunur og millumkommunufelagsskapir kunnu skuldbindast við láni, borgan o.ø.m.”

Sambært fyrireikandi arbeiðinum, orðaljóðinum og viðmerkingunum til § 56, er ásetingin í stýrisskipanarlógini ein beinleiðis endurtøka av tí rætti, sum kommunurnar longu frammanundan hava eftir § 82 í grundlógini.

Umframt staðfestingina í grundlógini og stýrisskipanarlógini um rættin hjá kommunum at skipa egin viðurskifti, er lokala sjálvræðið eisini ein týðandi táttur í evropeisku demokratisku siðvenjuni. Sambært evropeiska sáttmálanum um lokalt sjálvræði frá 1985, verður lokalt sjálvstýri hugsað sum rætturin og førleikin hjá einum lokalum myndugleika, innan lógarinnar karmar, at stýra og fyrisita einum munandi parti av almennum viðurskiftum, við egnari ábyrgd og við støði í áhuganum hjá fólkinum á staðnum.

Almennar uppgávur skulu í høvuðsheitum røkjast av myndugleikum, sum eru borgaranum næstir. Um annar myndugleiki skal røkja uppgávuna, so eigur hetta at vera grundað á, hvat slag og av hvørjum vavi uppgávan er, og við atliti at virkisføri og fíggjarligum viðurskiftum. Tær heimildir, ið eru lagdar til lokalar myndugleikar, eiga vanliga at vera givnar til fulnar og vera óskerdar. Heimildirnar eiga heldur ikki at verða gjørdar verri ella avmarkast av øðrum almennum myndugleika, uttan so at hetta er heimilað í løggávuni. Europeiski sáttmálin um lokal sjálvræði ásetur nakrar meginreglur, og eru hesar í høvuðsheitum,

- at almennar uppgávur skulu røkjast av einum myndugleika so tætt at borgaranum sum gjørligt,
- at teir lokalu myndugleikarnir skulu hava veruligt sjálvræði yvir teimum uppgávum, ið landafrøðiliga liggja lokalt, og
- at lokalu myndugleikarnir skulu kunna útvega sær fígging til at loysa uppgávuna, her í millum eisini rætt til at útskriva lokalan skatt.

## KOMMUNUNALRÆTTURIN

Kommunalrættur verður vanliga býttur í 3 ymsar tættir, sum er: løggáva, ið regulerar kommunal viðurskifti, kommunufulltrúin og kommunala eftirlitið.

Løggáva um kommunal viðurskifti snýr seg í høvuðsheitum um at skipa løggávu viðvíkjandi økjum, har kommunur hava skyldur og heimildir mótvegis borgarum sínum. Kommunufulltrúin er eitt heimildargrundarlag sum ikki er regulerað í lóg, men sum kommunurnar kunnu nýta sum heimild at virka á, um ávísar treytir eru loknar. Umframt ta løggávu, sum beinleiðis regulerar kommunal viðurskifti, eru kommunurnar eisini almennir myndugleikar, og eru tær tí eisini fevndar av fyrisitingarligari løggávu sum t.d. fyrisitingarlóg, lóg um innlit í fyrisitingina o.t.

Viðurskiftini hjá føroysku kommununum verða stýrd yvirskipað eftir kommunustýrislógini frá 2000. Sambært hesi lóg er kommunustýrið evsti politiski og fyrisitingarligi myndugleiki í kommununi og hevur evsta vald og evstu ábyrgd av kommunalum viðurskiftum.

Hendingar í árinum

# Farloyvi tað sum eftir var av valskeiðnum

Kommunan hevði fingið fyrispurning frá tiltakslimi í kommunustýrinum. Spurningurin var, um viðkomandi kundi fáa farloyvi frá starvinum sum kommunustýrislimur, tað sum eftir var av valskeiðnum.

Skrivstovan upplýsti, at starvið sum kommunustýrislimur er fólkavalt. Starvið er tí ein borgaraskylda ella eitt sonevnt borgarligt umboð, og er sostatt ikki sum onnur størv. Hetta merkir, at mann hevur skyldu at røkja starvið í øllum valskeiðnum. Í hesum liggur eisini ein møtiskylda, herundir ein skylda at møta bæði til kommunustýris- og nevndarfundir.

Røkir kommunustýrislimurin ikki starvið, skal hetta vera grundað á orsøk, sum løgfrøðiliga er at meta sum lógligt forfall. Talan kann til dømis vera um sjúku ella skyldur í sambandi við annað borgarligt umboð (løgtingsarbeiði, leikdómari í rættinum og tílíkt).

Ein kommunustýrislimur kann ikki biðja sær farloyvi alt valskeiðið, men limurin kann tó sleppa undan møtiskylduni í teimum førum, har talan er um lógligt forfall.

Viðvíkjandi tiltakslimum er sjálvandi greitt, at hesir bert hava møtiskyldu, tá ið teir eru innkallaðir. Er tiltakslimur innkallaður vegna lógligt forfall hjá kommunustýrislimi, hevur viðkomandi øll rættindi og allar skyldur, sum áliggja kommunustýrislimum – og harvið eisini møtiskyldu.

Ynskir kommunustýrislimur hinvegin at sleppa heilt úr kommunustýrinum, skal farast fram eftir reglunum í kommunalu vallógini. Somuleiðis er skylda at fara úr kommunustýrinum, um limurin ikki longur lýkur treytirnar fyri valbæri.

Landsstýrið hevur eftirlit við kommununum. Kommunala eftirlitið er eitt sokallað legalitetseftirlit, sum merkir, at landsstýrið hevur eftirlit við, at kommunurnar halda galdandi lóggávu. Hinvegin skal eftirlitið ikki taka støðu til, hvørt kommunurnar bera seg skynsamt at, tí hetta hoyrir undir politiska frælsið hjá kommununum at gera av. Kommunala eftirlitið hevur eisini heimild at gera av ivamál um, hvar mørkini fyri heimildum eftir kommunufulltrúini eru.

Samanumtikið eru eyðkennini fyri lokala sjálvræðl,

- at kommununnar tilverurættur er tryggjaður í grundlóg og stýrisskipanarlóg og byggir á evropeiska demokratiska siðvenju,
- at kommunurnar eru sjálvstøðugar politiskar og fyrisitingarligar eindir við fíggjarligum og politiskum frælsi,
- at kommunurnar hava frælsi at gera egnar raðfestingar í mun til tær uppgávur, tær skulu røkja,
- at kommunur ikki eru undirskipaðir stovnar undir landinum og tískil kann landið ikki geva kommununum bindandi boð,
- at kommunur hava rætt til at útskriva egnar skattir og at nýta hesar inntøkur eftir egnum politiskum raðfestingum.

# 11. Um Kommunufelagið

**STÝRIÐ 2023**
**STÝRI FELAGSINS ER MANNAÐ VIÐ BORGARSTJÓRUM SAMSVARANDI § 7 Í VIÐTØKUNUM:**

Tórbjørn Jacobsen, formaður, Runavíkar kommuna
Heðin Mortensen, næstformaður, Tórshavnar kommuna
Bjarni Johansen, Vágs kommuna
Bjarni Prior, Vága kommuna
Bjørg á Rógvi, Vestmanna kommuna
Dávur Juul, Fuglafjarðar kommuna
Eyð Ellingsgaard, Sørvágs kommuna
Heri Sverrason, Sands kommuna
Jóanis Lisberg, Fámjins kommuna
Jógvan Kruse, Sunda kommuna
Karl H. Johansen, Klaksvíkar kommuna
Kristin Michelsen, Tvøroyar kommuna
Per Martin Gregersen, Eysturkommuna

**STARVSFÓLKABÓLKURIN 2023**
**Í STARVSBÓLKINUM ERU UMSITINGARLEIÐARARNIR SAMBÆRT § 8 Í VIÐTØKUNUM:**

Bjørgfríð Ludvig, forkvinna, Tórshavnar kommuna
Arni Teindal, Fámjins kommuna
Dinna Jensen, Runavíkar kommuna
Erik Lervig, Eysturkommuna
Erland Berg Danielsen, Sunda kommuna
Fróði Mortensen, Tvøroyrar kommuna
Jóanis Erik Køtlum, Fuglafjarðar kommuna
Jóhan Henrik Ellefsen, Vága kommuna
Marner Højsted, Sands kommuna
Petry Harginsdóttir Mortensen, Vágs kommuna
Rúna Ingunardóttir, Vestmanna kommuna
Rúni Rasmussen, Klaksvíkar kommuna
Sunrid Rasmusen, Sørvágs kommuna

**NEVNDIN Í KAF**

Per Martin Gregersen, formaður, Eysturkommuna
Jógvan Kruse, næstformaður Sunda kommuna
Dávur Juul, Fuglafjarðar kommuna
Bjarni Johansen, Vágs kommuna
Bogi Bendtsen, SEV
Jóhannus Danielsen , IRF

**SKRIVSTOVAN**

Kommunufelagið
R. C. Effersøesgøta 26
100 Tórshavn
Telefon 30 24 80
www.kf.fo
kf@kf.fo

**KOMMUNUFELAGIÐ · KF.FO**

Eyðun Christiansen, stjóri · eydunc@kf.fo · 28 24 80
Janus Haraldsen, løgfrøðingur · janush@kf.fo · 22 54 80
Hans Kári Vang, búskaparfrøðingur · hanskariv@kf.fo · 78 70 05
Armgarð Hammer, skrivari · armgard@kf.fo · 28 24 81
Sigrid J. Dalsgaard, verkætlanarleiðari · sigridjd@kf.fo · 27 01 15
Martin Johannessen, skrivstovufólk · martin@kf.fo

**KOMMUNALA ARBEIÐSGEVARAFELAGIÐ · KAF.FO**

Anita Fuglø, leiðari · anita@kaf.fo · 22 63 39
Bina Reginsdóttir, fulltrúi · binar@kaf.fo · 22 98 66
Bjarni Mortensen, fulltrúi · bjarnim@kaf.fo · 28 03 39

**BARNAVERNDARSTOVAN · BVS.FO**

Oddbjørg Balle, leiðari · ob@bvs.fo · 22 56 96
Anna Dam, løgfrøðiligur ráðgevi · annadam@bvs.fo · 51 90 82
Brynhild Høgnadóttir, samskiftisfólk · brynhildh@bvs.fo · 26 06 80
Anna Maria Troest, sosialráðgevi · annat@bvs.fo · 21 44 81

**SSP-RÁÐGEVINGIN · SSP.FO**

Súsanna í Króki, SSP-ráðgevi · sik@ssp.fo · 22 26 93
Daisy J. Iversen, SSP-ráðgevi · di@ssp.fo · 22 26 94

**LISTALEYPURIN · LISTALEYPURIN.FO**

Lasse Thorning Jæger, verkætlanarfólk · listaleypurin@listaleypurin.fo · 21 01 25

### Hendingar í árinum

# Afturtøka av kommunustýrissamtykt

Ein kommuna hevði gjørt av at fara undir eina verkætlan, sum kravdi at jørð varð keypt til endamálið. Kommunan hevði samtykt at keypa jørðina, men tað vísti seg, at ánararnir ikki vildu selja. Alternativið hjá kommununi var tí at fara undir eina tilgongd við ognartøku. Kommunustýrið vildi tí steðga á, men spurningurin var, hvat gerast skuldi við ta samtykt, sum longu var gjørd um at ogna sær lendið – harímillum, um samtyktin skuldi ógildast.

Skrivstovan vísti á, at hetta var viðkomandi spurningur at seta sær, tí tað eru ikki allar samtyktir, ið kommunan uttan víðari kann taka aftur, t.d. loyvi sum verður givið borgara. Talan var her um eina ætlan hjá kommununi, ið nú ikki kundi fremjast sum ætlað. Tá ið tað harafturat ikki var knýtt nøkur lógarásett skylda ella líknandi at einari slíkari verkætlan, so bar til at taka aðra avgerð.

Skrivstovan upplýsti, at kommunan hevur skyldu at fremja allar lógligar samtyktir hjá kommunustýrinum. Her var talan um lógliga samtykt, og tí var ikki rætt at ógilda hana. Rættari var at gera nýggja samtykt – til dømis við støði í einari stuttari lýsing av málsgongdini.

# Viðtøkur fyri Kommunufelagið

## NAVN, LIMASKAPUR OG HEIMSTAÐUR

**§ 1.** Navn felagsins er Kommunufelagið, og hevur felagið heimstað í Tórshavn

**§ 2.** Allar kommunur í Føroyum kunnu gerast limir.

**§ 3.** Upptøka av nýggjum limum verður góðkend á aðalfundi.

## ENDAMÁL

**§ 4.** Endamál felagsins er at virka fyri felags áhugamálum, størri kommunalum sjálvræði, og betri samstarvi millum kommunurnar.

## AÐALFUNDURIN

**§ 5.** Aðalfundurin er hægsta vald felagsins.
*Stk. 2.* Borgarstjórin umboðar kommunustýrið til at taka avgerð á aðalfundinum. Aðrir kommunustýrislimir hava rætt at møta.
*Stk. 3.* Boðast skal til aðalfund við í minsta lagi 30 daga freist. Fundarskrá verður kunngjørd limakommununum í seinasta lagi 14 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 4.* Limir, ið vilja hava mál til viðgerðar á aðalfundinum, senda felagnum hesi í minsta lagi 21 dagar innan aðalfundin.
*Stk. 5.* Á aðalfundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar undan aðalfundinum, tó so, at eingin kommuna hevur fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 6.* Er ikki annað tilskilað í hesum viðtøkum, verða avgerðir á aðalfundi tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 7.* Aðalfundurin er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av limunum eru møttir.

**§ 6.** Ársaðalfundur verður hildin á hvørjum árið í seinasta lagi 30. apríl við hesi skrá:
a) Val av fundarstjóra.
b) Formaðurin letur frágreiðing um virksemi felagsins í farna árinum og um framtíðarætlanir felagsins.
c) Framløga av roknskapi til góðkenningar.
d) Val av grannskoðara.
e) Innkomin uppskot.
f) Ymiskt.
*Stk. 2.* Eykaaðalfundur verður hildin, tá ið stýrið heldur tað vera neyðugt, ella tá ið minst helmingurin av limakommununum skrivliga biðja um tað. Innkalling til eykaaðalfund fer fram á sama hátt og við somu freist, sum til vanligan aðalfund.

## STÝRIÐ

**§ 7.** Tá talan ikki er um mál, sum skulu viðgerast á aðalfundi, er ovasta leiðsla felagsins eitt stýri við 13 limum, sum er sett saman fyri 4 ár í senn. Stýrislimur skal vera borgarstjóri.
*Stk. 2.* Stýrið tekur við 1. januar eftir kommunustýrisval, og verður stýrið valt eftir hesi skipan:

- Norðuroyggjar (Klaksvík, Hvannasund, Viðareiði, Húsa k., Kunoy og Fugloy) 1 lim.
- Eystur Eysturoy (Fuglafjørður, Eystur k.) 2 limir.
- Vestur Eysturoy (Nes, Runavík, Sjóvar k.) 1 lim.
- Sundalagið (Sunda k. og Eiði) 1 lim.
- Streymoy (Tórshavn) 1 lim.
- Vesturstreymoy (Vestmanna og Kvívík) 1 lim.
- Vágar (Sørvágur, Vága k.) 1 lim.
- Sandoy (Sandur, Skopun, Skálavík, Húsavíkar k. og Skúvoy) 1 lim.
- Norður Suðuroy (Hvalba, Tvøroyri og Fámjin) 1 lim.
- Suður Suðuroy (Hov, Porkeri, Vágur og Sumba) 1lim.

Kommunustýrini í hvørjum einstøkum øki gera semju um at velja ein stýrislim. Semjast kommunurnar ikki um umboðanina, verður borgarstjórin í størstu kommununi umboð fyri økið.
*Stk. 3.* Kommunurnar sum sambært stk. 2 ikki fáa lim í stýrið, velja 2 umboð eftir hesum leisti.

- Kommunurnar við fleiri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð
- Kommunurnar við færri enn 750 íbúgvum velja sínámillum eitt umboð

*Stk. 4.* Tá ið valt verður sambært stk. 3, hevur hvør kommuna eina atkvøðu. Atkvøðugreiðslan fer fram eftir meirilutavalháttinum sambært § 2 í kommunustýrislógini.
*Stk. 5.* Stýrið skipar seg sjálvt við formanni og næstformanni eftir somu mannagongd, sum formaður og næstformaður verða valdir í kommunustýrum, tó so, at formaður og næstformaður verða valdir fyri 2 ár í senn.
*Stk. 6.* Stýrisfundur er viðtøkuførur, tá ið minsta lagi helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Hvør stýrislimir hevur eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva 1. januar í teimum kommununum, sum stýrislimurin umboðar. Tó so, eingin stýrislimir kann hava fleiri enn 45 % av samlaðu atkvøðunum.
*Stk. 7.* Avgerðir verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Miðast skal tó ímóti, at stýrisavgerðir eru einmæltar.
*Stk. 8.* Stýrisfundur skal vera í minsta lagi eina ferð hvønn ársfjórðing. Formaðurin kann kalla stýrið til fundar, tá mál er, sum krevur stýrisavgerð, og sum ikki kann bíða til næsta regluliga fund. Stýrið kann eisini verða kallað saman, tá ið minst helmingurin av stýrislimunum skrivliga biðja um tað
*Stk. 9.* Fráboðan um stýrisfund verður send stýrislimum 14 dagar áðrenn fund.

## STARVSBÓLKURIN

*§ 8.* Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/-stjórarnir í teimum kommunum, sum hava umboð í stýrinum.

Stýrið velur starvsbólkaformann fyri tvey ár í senn.
*Stk. 2.* Starvsbólkurin skal fyrireika mál, sum skulu viðgerast á stýris- og aðalfundi, og hann skal arbeiða við øllum málum, sum stýrið beinir til hansara.
*Stk. 3.* Starvsbólkurin hevur vanliga fund eina ferð um mánaðin.
*Stk. 4.* Tó skal formaðurin kalla til fundar, hvørja ferð stýrisfundur er lýstur, um so er, at mál, sum skulu viðgerast har, ikki eru liðug fyrireikað.
*Stk. 5.* Allir starvsbólkalimir skulu møta á stýrisfundum.
*Stk. 6.* Stýrisformaðurin skal hava fundarboð til hvønn starvsbólkafund.

## SKRIVSTOVAN

**§ 9.** Stýrið setur og loysir úr starvi stjóra, ið hevur ábyrgdina mótvegis stýrinum, fyri at virksemi felagsins verður rikið sambært galdandi reglum.
*Stk. 2.* Stjórin hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi, og skal í samstarvi við starvsbólkin og stýrið umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.
*Stk. 3.* Stýrið ger starvsskipan fyri stjóran.
*Stk. 4.* Stjórin setur og loysir úr starvi onnur starvsfólk eftir ásetingum í starvsskipanini sambært stk. 3.
*Stk. 5.* Starvsbólkurin er dagliga bindiliðið millum stjóran og limakommunurnar.

## FÍGGJARVIÐURSKIFTI

**§ 10.** Útreiðslurnar av at reka felagið verða goldnar av limakommununum. Limagjaldið verður ásett samsvarandi íbúgvaratalinum í kommununum 1. januar í tí ári, sum fíggjarætlanin verður samtykt. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45 % av limagjaldinum.
*Stk. 2.* Stýrisformaðurin ger saman við starvsbólkaformanninum og stjóranum uppskot til fíggjarætlan fyri felagið komandi fíggjarár, sum hann fyrileggur stýrinum til góðkenningar í seinasta lagi í apríl ársfjórðingi.
*Stk. 3.* Áðrenn fíggjarætlan felagsins verður viðgjørd í stýrinum, skal starvsbólkurin hava gjørt sítt tilmæli.
*Stk. 4.* Limakommunurnar rinda í minsta lagi 1/12 part av limagjaldinum hvønn mánað til felagið.
*Stk. 5.* Eingin limakommuna heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hennara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.
*Stk. 6.* Ongar avgerðir í málum, sum krevja kommunustýrissamtykt, eru bindandi fyri limakommunurnar, uttan tílík samtykt fyriliggur.

## ROKNSKAPUR

**§ 11.** Stjórin hevur ábyrgd av roknskaparførsluni.
*Stk. 2.* Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum ella skrásettum grannskoðara.

## AÐRAR ÁSETINGAR

**§ 12.** Felagið verður teknað av stýrisformanninum og starvsbólkaformanninum ella stjóranum í felag, ella av tveimum stýrislimum saman við starvsbólkaformanninum ella stjóranum.

**§ 13.** Samtyktir um broytingar av viðtøkunum ella avtøku av felagnum skulu gerast av aðalfundinum. Í minsta lagið ¾ av atkvøðutalinum skulu vera umboðað, og uppskotið skal samtykkjast við 3/5 av greiddum atkvøðum.
*Stk. 2.* Er fundurin ikki viðtøkuførur, verður nýggjur fundur 14 dagar seinni, og er hesin viðtøkuførur uttan mun til, hvussu nógvar atkvøður eru umboðaðar. Samtykt skal tó vera við 3/5 av greiddum atkvøðum.

**§ 14.** Við minst 6 mánaða ávaring kann ein kommuna siga upp limaskap sín í felagnum til ein 1. januar.
*Stk. 2.* Kommunur, ið melda seg úr felagnum, hava einki krav móti felagnum ella ognum felagsins, og hefta ikki fyri skyldur felagsins.

**§ 15.** Verður felagið tikið av, falla ognirnar aftur til limakommunurnar í sama lutfalli, sum tær hava luttikið í útreiðslum felagsins seinasta roknskaparárið.

## SKIFTISÁSETINGAR

**§ 16.** Felagið tekur yvir øll rættindi og allar skyldur hjá KSF og FKF.

**§ 17.** Í samband við fyrsta valskeiðið, sum verður trý ár, tekur stýrið sjálvt avgerð um val av formanni og næstformanni sambært § 7, stk. 5, og viðvíkjandi val av starvsbólkaformanni sambært § 8, stk. 1.

**§ 18.** Limagjald fyri fyrsta roknskaparárið verður samtykt á stovnandi aðalfundi.

## GILDISKOMA

**§ 19.** Viðtøkur felagsins fáa gildi frá 1. januar 2014.

Samtykt á stovnandi aðalfundi 13. desember 2013

# Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**§ 1 Navn og limaskapur**
*Stk. 1.* Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.
*Stk. 2.* KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF
*Stk. 3.* Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF
*Stk. 4.* Heimstaður felagsins er Tórshavn

**§ 2 Endamál felagsins**
*Stk. 1.* Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

- samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt
- røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.
- virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir
- gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið
- virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst
- við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

**§ 3 Upptøka**
*Stk. 1.* KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.
*Stk. 2.* Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

**§ 4 Útmeldan**
*Stk. 1.* Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.
*Stk. 2.* Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.
*Stk. 3.* Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

**§ 5 Ársfundur**
*Stk. 1.* Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.
*Stk. 2.* Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.
*Stk. 3.* Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.
*Stk. 4.* Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.
*Stk. 5.* Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør.
Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 6.* Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.
*Stk. 7.* Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra
b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.
c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi
d) Innkomin mál.
e) Ymiskt

**§ 6 Nevndin**
*Stk. 1.* Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.
*Stk. 2.* Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.
*Stk. 3.* Nevndin ger sína egnu starvsskipan.
*Stk. 4.* Nevndin velur sjálv formann og næstformann.
*Stk. 5.* Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.
*Stk. 6.* Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.
*Stk. 7.* Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.
*Stk. 8.* Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**
*Stk. 1.* Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.
*Stk. 2.* Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.
*Stk. 3.* Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.
*Stk. 4.* Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

**§ 8 Limagjald**
*Stk. 1.* Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.
*Stk. 2.* Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.
*Stk. 3.* KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.
*Stk. 4.* Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

**§ 9 Tekning**
*Stk. 1.* Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

**§ 10 Samráðingarnevnd**
*Stk. 1.* Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.
Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.
*Stk. 2.* Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.
*Stk. 3.* Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

**§ 11 Roknskapur og grannskoðan**
*Stk. 1.* Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.
*Stk. 2.* Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

**§ 12 Tagnar- og upplýsingarskylda**
*Stk. 1.* Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.
*Stk. 2.* Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

**§ 13 Trætumál**
*Stk. 1.* Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.
*Stk. 2.* Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**
*Stk. 1.* Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.
*Stk. 2.* Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.
*Stk. 3.* Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**
*Stk. 1.* Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.
*Stk. 2.* Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**
*Stk. 1.* Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014

# Viðtøkur fyri Barna-verndarstovu Føroya

**§ 1.** Barnaverndarstova Føroya er felagskommunalur stovnur, sum kommunurnar eiga.

### ENDAMÁL STOVNSINS

**§ 2.** Barnaverndarstovan skal arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkini úti um landið og seta á stovn og reka fosturforeldraskipan sambært ásetingunum í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd við seinni broytingum.

### POLITISK LEIÐSLA

**§ 3.** Ovasta politiska leiðsla stovnsins er stýrið í Kommunufelagnum.

### FYRISITING

**§ 4.** Stjórin fyri KF setir leiðara at hava dagligu fyrisitingarligu og fakligu leiðsluna av Barnaverndarstovuni.
*Stk. 2.* Stjórin fyri KF letur gera starvsskipan fyri leiðaran.
*Stk. 3.* Stjórin í KF setur og loysir úr starvi øll starvsfólk á Barnaverndarstovuni
*Stk. 4.* Leiðarin fyri Barnaverndarstovuna vísir fyrisitingarliga til stjóran fyri Kommunufelagið.

### FÍGGING

*§ 5.* Kommunufelagið rindar allar útreiðslur fyri Barnaverndarstovuna
*Stk. 2.* leiðarin ger saman við stjóranum innan 1. juli eina fíggjarætlan sum verður partur av samlaðu fíggjarætlanin hjá KF.

### GRANNSKOÐAN

**§ 6.** Roknskapurin verður grannskoðaður, sum ein partur í roknskapinum hjá KF.

### GILDISKOMA

**§ 7.** Hesar viðtøkur koma í gildi 1. januar 2014.

### SKIFTISÁSETING

**§ 8.** Verandi nevnd fyri Barnaverndarstovuna – formenninir í KSF og FKF, áðrenn Kommunufelagið varð stovnað – halda áfram hetta valskeiðið til 1. januar 2017, men leggja øll mál av týdningi fyri stýrið í KF.

Tórshavn 17.01.2014

Hendingar í árinum

## Kæra krevur lógarheimild

Ein kommuna hevði tikið avgerð í einum máli um val av veitara til eitt arbeiði ella eina uppgávu. Ein av veitarunum, sum ikki varð valdur, bað í hesum sambandi um at fáa vegleiðing um, hvussu avgerðin hjá kommununi kundi kærast.

Skrivstovan vísti á, at avgerðir hjá kommununi bert kunnu kærast til landsstýrismannin/Kærustovnin, tá ið hetta er beinleiðis ásett í løgtingslóg. Sum dømi um hetta kann nevnast § 19 í byggilógini.

Aðrar avgerðir, sum kommunan tekur mótvegis borgarum/fyritøkum, eru at meta sum endaligar innan fyrisitingina. Hetta merkir í stuttum, at avgerðirnar ikki kunnu kærast. Í slíkum føri er tí rættast at vegleiða um, at málið kann leggjast fyri dómstólarnar.

Skrivstovan hevði ikki kunnleika til lógarásetingar um kæru av málum av slagi, sum kommunan hevði tikið avgerð um. Var kommunan samd í hesum, varð tí mælt til at boða frá, at avgerðin er endalig innan fyrisitingina og vegleiða um møguleikan at leggja málið fyri dómstólarnar. Kommunan kundi frammanundan hesum umhugsa at ringja til Kærustovnin og spyrja seg fyri, um stovnurin viðger mál av slíkum slagi.

Hendingar í árinum

# Fyritøka bað um innlit í leigusáttmála hjá kappingarneyta

Eini kommunal høli vóru útleigað til eina privata fyritøku. Ein kappingarneyti hjá hesari fyritøkuni vendi sær til kommununa og bað um innlit í leiguprísin, og kommunan spurdi seg tí fyri, hvussu rættast var at fara fram viðvíkjandi slíkari innlitsumbøn. Ítøkiliga bað kommunan um eina nærri lýsing av, hvussu undantøkini í innlitslógini skuldu tulkast í slíkum føri.

Skrivstovan upplýsti, at tað vanliga er viðkomandi at umhugsa atlitið til leigaran/fyritøkuna (§ 12, stk. 1, nr. 2). Dømi eru um, at atlit til t.d. handilsloynidómar ella kappingarstøðuna hjá einari fyritøku kunnu føra til eina avmarking av innlitinum. Tá ið innlit verður avmarkað orsakað av atlitum til fyritøkur, skal sambært praksis talan vera um rættiligar ítøkiligar vandar fyri fyritøkuna. Og málini snúgva seg vanliga um eitthvørt týðandi negativt árin á kappingarstøðuna, t.d. um eitt ávíst skjal avdúkar ein serligan framleiðsluhátt.

Hetta eigur kommunan at taka støðu til, og tískil er ofta neyðugt, at fyritøkan verður hoyrd um innlitsumbønina. Á tann hátt kann kommunan kunna seg um tey viðurskifti, sum fyritøkan leggur dent á, og meta um hetta kann føra til avmarking av innlitinum. Í hesum sambandi skal leggjast til merkis, at kommunan altíð skal taka rætta avgerð samsvarandi lógini, og tí kann innlitið ikki sýtast, bert tí fyritøkan talar ímóti at lata innlit í ávísar upplýsingar.

Somuleiðis kann vera viðkomandi at umhugsa atlitið til kommununa sjálva (§ 13, stk. 1, nr. 5). Dømi er um kommunu, ið partvíst kundi nokta innlit, tí kommunan sum útleigari var í kapping á leigumarknaðinum. Kappingarstøðan gjørdi, at kommunan kundi halda aftur ávísar upplýsingar í leigusáttmálanum fyri at verja egna samráðingarstøðu og tryggja støðuna hjá kommununi sum partur í einari avtalu. Innlitið varð tí lógliga avmarkað til allan sáttmálan við undantaki av upplýsingum um leigukostnað, depositum og leiguavgjald.



Hendingar í árinum

# Skal varakommunustýrislimur inn í stýrið fyri samstarvið?

Ein kommunustýrislimur hevði biðið um farloyvi, og avgjørt varð at kalla varalim inn. Ongin ivi var um, at varalimur tók sæti í kommunustýrinum og í teimum nevndum, sum fyrstvaldi kommunustýrislimurin sat í. Spurningurin var tó, um varalimurin eisini skuldi inn í stýrið fyri eldrasamstarvið – ella um tað var varalimurin í eldrasamstarvinum, sum skuldi fáa sæti har.

Skrivstovan upplýsti, at ongin greið støða er tikin til hetta í viðkomandi lógarverki, og neyðugt er tí at gera eina tulking av lógargrundarlagnum.

Staðfestast kundi, at bæði kommunustýrini og stýrini í eldrasamstørvunum kring landið verða vald fyri alt (kommunu)valskeiðið. Og bæði kommunustýrini og samstarvsstýrini hava egnar skipanir við varalimum. Í fyrra førinum verða varalimirnir beinleiðis fólkavaldir, meðan í seinna førinum verða teir valdir millum kommunustýrislimirnar.

Málsliga verður eisini orðið "varalimur" brúkt. Hetta gevur eina ábending um eitt sterkari mandat enn til dømis "tiltakslimur". Vanliga fatanin av "varalimi" er helst, at varalimurin skal taka sæti, tá ið fyrstvaldi (ella ein av fleiri fyrstvaldu) bera seg undan av onkrari orsøk.

Tulkingin hjá skrivstovuni er tí, at tað er rættast at síggja kommunustýrið og stýrið í samstarvinum sum hvør sítt við hvør síni skipan og við hvør sínum lista av varalimum. Ein varalimur, sum tekur sæti í kommunustýrinum, hevur tí ikki nakran sjálvskrivaðan rætt til eitt sæti í samstarvsstýrinum fyri sama kommunustýrislim.

Samstarvsstýrið hevur sostatt sína egnu skipan við varalimum, og tað er hendan skipan, sum eigur at vera fylgd, tá ið samstarvsstýrislimi berst frá at møta í eitt tíðarskeið. Niðurstøðan var sostatt, at varalimurin í kommunustýrinum ikki eisini skuldi taka sæti í stýrinum fyri eldrasamstarvið.

NUDLAVIRKIÐ